Síða 9

# FFblaðið

BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

Nr. 361 Hósdagur 23. februar 2006 15,-



Sofus Poulsen, 5. partur:

## Tá Gullborg sakk





P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8
Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 311909 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo


## Kári í Edens hava



Donsku hermenninir í Irak eru grannar hjá Edens hava. Kári úr Havn er ein teirra.

Síða 12






## FF-blaðið fær viðhald í síni lýsing av (ó)stýrisskipanini

Síða 4

## Fiskavirkisvitjan í Íslandi

Bólkur hjá Fiskivinnuskúlanum hevur vitjað flakavirki í Íslandi.

Síða 6


KÄRCHER



Vit eru einaumboð fyri KÄRCHER trýstspularum til ídnað.



Vit umvæla eisini

TÓRSHAVNAR MASKINHANDIL
v/Tummas Andreasen · Varðagøta 29-30
FO-100 Tórshavn · Tlf. 31 34 42


## Visjón 2015 og veruleiki í 2006

Tað nyttar einki at tosa um 2015 um einki verður gjørt við støðuna í 2006.

Síða 2



FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA

**FF-blaðið:** Bryggjubakki
postsmoga 58, FO-110 Tórshavn
tlf: 311569 · fax: 318769
teldupostur: ff-blad@post.olivant.fo
heimasíða: www.fiskimannafelag.fo
**Útgevari:** Føroya Fiskimannafelag

**Blaðstjóri:** Óli Jacobsen
**Layout:** Føroya Fiskimannafelag
**Prenttilgerð:** Føroya Fiskimannafelag
**Prent:** Prentmiðstøðin

**Loyvt er at endurprenta og endurgeva tilfar úr blaðnum, tá keldan er uppgivin**

**- kemur út annanhvønn hósdag**

## Visjón 2015 og veruleiki 2006:

# Hvussu er við rættindum hjá borgarunum?

Í dag skipar løgmaður fyri fundi í einum sokallaðum "Visjónstorgi", sum fyrst skal fáa framlagt "Visjón 2015", og sum síðan umrøða og viðgera frágreiðingar í samband við hetta arbeiðið. Við á hesum fundi verða leiðandi politikarar, embætismenn og umboð fyri ymiskar felagsskapir sum arbeiðsgevarafeløg og løntakarafeløg.

Vit vóru eins og nógv onnur feløg á fundi við løgmann um Visjón 2015 í apríl 2005. Tá førdu vit fram, at vit kunnu taka undir øllum ætlanum um at gera Føroyar til besta land í 2015. Men ein fortreyt fyri at kunna byggja eini nýggj hús er, at sjálv grundin er í lagi, ella fyri at vera bíbilskur, at húsið er bygt á klettagrund. Hetta merkir fyrst og fremst, at samfelagið er skipað við føstum mannagongdum, og at tað fylgir grundreglunum í einum rættarsamfelag. Sum eitt fakfelag leggja vit serligan dent á, at borgarin kann vita seg tryggan um, at í samfelagnum ræður lóg og landaskil, og at borgarin uttan óneyðugan háva veit, at hann fær tann rætt sum hann eigur.

Vit sum arbeiða við hesum viðurskiftum vita, at hesar fortreytir eru ikki til staðar í dag. Her kunnu vit bert vísa til greinir í hesum og undanfarnum tveimum bløðum. Her kann eisini verða víst til heimasíðurnar hjá Føroya Fiskimannafelag: **www.fiskimannafelag.fo** og hjá Stjórnarskipanarnevndini: **www.ssn.fo**

Okkara royndir vísa, at borgarin verður roknaður sum ein mótpartur hjá politisku og almennu umsitingini, har tað skuldi verið mótsatt. Hetta fer við einum hópi av kreftum bæði hjá tí borgara, sum berjist fyri sínum rættindum og hjá tí myndugleika, sum ger alt hann kann fyri at halda tørn fyri móti borgaranum. Tað er óneyðugt at siga, at hesar kreftir kundu verið brúktar meira konstruktivt.



*Løgmaður heilsar Havnar Arbeiðskvinnufelag í samband við 70 ára dagin. Men hvussu við rættindum hjá borgarum, her eisini fakfelagslimum?*

Vit halda, at tað skuldi verið heilt upplagt, at ítøkilig stig verða tikin at leggja eina skipaða ætlan, so hesi viðurskifti eisini koma uppá pláss. Her hava vit so mikið av royndum, at vit kundu givið eitt heilt ítøkiligt íkast á hesum øki, sum vit annars longu hava gjørt.

Vit hava leingi havt varhuga av, at politiska skipanin als ikki sær hetta sum ein trupulleika, og tí hevur hesin spurningur ikki minsta áhugan hjá politisku leiðsluni, uttan mun til hvør hon er.

Hetta tykjast vit at fáa váttað av innbjóðingini til fundin í dag. Her verða nevnd 13 ymisk øki, sum tað skal arbeiðast við, og har tað verða settir "strategibólkar" fyri hvørt øki. Tað tykist, sum at einasta mál er at skapa búskaparligan vøkstur, men sjálv grundarlagið, nevniliga eitt skipað rættarsamfelag, verður als ikki tikið uppá tungu.

Vit meta framvegis, at tað nyttar lítið at tosa um 2015, um vit ikki gera nakað við ítøkiligar forðingar, sum vit kunnu staðfesta dagin í dag. Ein politisk umsitingarlig skipan, sum heilt tilvitað ikki fylgir reglunum í einum rættarsamfelag, kann ikki verða nakað álit í nakrari visjón av nøkrum slag.

Okkara uppskot er, at tað verður settur ein bólkur sum serstakliga skal útgreina tær royndir sum "borgarin" í víðastu merking hevur av verandi umsiting, og sum síðan skal koma við uppskotum um mannagongdir í framtíðini. Hetta vildi verið ein ítøkilig visjón!

**Línubustir og goggar**
Hondbundin føroysk línubust
og hondgjørdir goggarar



Verða sendar um alt landið

**Bílegging:**
tlf: 42 40 34 / 42 30 01
fartlf: 21 33 17
fax: 42 47 97

**Fløttislið** (limur í Føroya blindafelag)




**MANNING TIL NORRÖNU**
Søkt verður eftir manning til Norrönu at byrja uml. 1. apríl

Talan er um øll størv innan catering.

- chefkokkur
- móttøkufólk
- tænarar
- barrfólk
- reingerðarfólk
- goymslufólk
- fólk til kafeteria
- fólk til handlarnar
- kokkar
- bakarar

Smyril Line bjóðar áhugaverd og avbjóðandi størv í einum altjóða umhvørvi har lyklaorðini eru:

- Ábyrgd
- Personligar avbjóðingar
- Dygd

- Faklig menning
- Persónlig menning

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst (ikki eldri enn 2 ár).**

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Løn og setanartreytir eru smb. galdandi sáttmála undir FAS-skipanini við Føroya Fiskimannafelag

Størvini verða sett umleið 1. apríl 2006.

Umsóknir og CV skulu sendast til:

Smyril Line
Manningardeildin
J. Broncks gøta 37
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til aðra av hesum tilskriftum:

crew@smyril-line.fo
hotel.manager@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM

**100% tryggleika?**





**Tí velja fleiri og fleiri maskinmeistarar Mobil smyrjiolju!**

petur & petur • 320870

**Mobil Oil Føroyar**

Mobil Oil Føroyar
Mykinesgøta 8, Boks 18
FO-110 Tórshavn
Tel 319354 – fax 311509
E-mail: sveising@post.olivant.fo

# Minningarorð um Hera Niclasen

Mikudagin 15. februar andaðist stjóri okkara, Heri Niclasen, ein knappan mána eftir, at hann fylti 60 ár. Heri verður borin til gravar á Tvøroyri sunnudagin.

Heri Niclasen varð borin í heim á Tvøroyri tann 17. januar 1946. Vaks upp og varð tvøramaður burturav, hóast han eisini búði og arbeiddi aðrastaðni. Eisini uttanlands. Men tá møguleiki var fyri tí, vitjaði Heri suðuraftur, og sínar seinastu dagar untist honum eisini at vera á Tvøroyri.

Heri var ein av teimum, sum veruliga livdi upp til orðini í Tvøroyrarsanginum hjá Poul F. Joensen, at ... "Urtin trívist best, har rótin rann." Og nú Heri verður borin út, verður sannað, at ... "Hitt síðsta hvíldarstað er best á jørð, millum blómur við Tvøroyrarfjørð."

Komin til manns lærdi Heri til fjarritara, og arbeiddi millum annað eitt áramál í Grønlandi. Men hann vildi sleppa heimaftur, og tað kom hann eisini.

Fyri góðum 20 árum síðan kom hann av álvara inn í ferðavinuna, tá hann í 1984 gjørdist marknaðarleiðari hjá Smyril Line. Eitt starv hann røkti fram til 1996. Í 1997 tók hann við sum sølustjóri hjá Atlantic Airways, har hann var, til hann í 2000 tók við sum stjóri á Ferðaráð Føroya. Hesum starvi sat hann í, nú hann andaðist.

Eisini í millumlanda samstarvi innan ferðavinnuna er Heri kendur av mongum. Serliga vóru tað VestNorden Travel Mart stevnurnar, hann gekk høgt uppí. Hann var eitt skifti formaður í Útnorður ferðavinusamstarvinum, VestNorden Tourist Board.

Heri var giftur Jensu, og eiga tey tvey vaksin børn og tvey ommu- og abbabørn. Við tykkum hava vit djúpastu samkenslu.

Friður verið við minninum um Hera Niclasen.

*Starvsfelagarnir*

# Sunnudagsskúli

Vit hava fingið eina nýggja mynd av sunnudagsskúlanum í Bethania umleið 1925. Myndin er tikin umleið somu tíð sum hann vit høvdu í blaði nr. 359. Tað eru bert heilt fá av børnunum, sum eru tey somu. Á fyrru myndini vóru bert gentur. Her eru dreingirnir í meiriluta. Sunnudagsskúlalærarar vóru Elisa á Mýruni og Hansina í Súnastovu.

Hóast myndin er 80 ára gomul, so liva fleiri eftir enn. Tann elsti vit vita um táttar í 90 ár. Mynd og nøvn hava vit fingið frá døtrunum hjá Lisu, Aslaug og Emmu.



Nøvnini er uppgivin frá vinstru:

Aftasta rað:

| | | |
|---|---|---|
| Nikal Thomsen | har Niðri | Syðrugøta |
| Erik Hansen | í Køkinum | Norðragøta |
| Per Petersen | | Rituvík |
| Martin Mikkelsen | á Lækjuni | Syðrugøta |
| Óla Jákup Hansen | á Túvu | Syðrugøta |
| Niels Hansen | á Rætt | Syðrugøta |
| Karl Thomsen | har Niðri | Syðrugøta |
| Leon Joensen | í Jørundstovu | Norðragøta |

Næstaftasta rað:

| | | |
|---|---|---|
| Hansina Heinesen | í Súnastovu | Norðragøta |
| Kjartan Jacobsen | á Teigum | Syðrugøta |
| Simon Thomsen | har Niðri | Syðrugøta |
| Hendrik Husgaard | hjá Líggjasi | Syðrugøta |
| Herluf Jacobsen | á Teigum | Syðrugøta |
| Hans J. Hansen | á Túvu | Syðrugøta |
| Hákun Hansen | á Rætt | Syðrugøta |
| | ein í Køkinum | Norðragøta |
| Hans Husgaard | hjá Líggjasi | Syðrugøta |

Næstfremsta rað:

| | | |
|---|---|---|
| Absalon Jacobsen | hjá Eliesari | Norðragøta |
| Turid Potts | í Bartalstovu | Syðrugøta |
| Herdis Jacobsen | hjá Benadikt | Syðrugøta |
| Kata Jacobsen | hjá Tummasi | Norðragøta |
| Palma Eliassen | á Lakjuni | Syðrugøta |
| Elkin Jacobsen | hjá Benadikt | Syðrugøta |
| Johanna Hansen | á Rætt | Syðrugøta |
| Sanna Hansen | á Rættt | Syðrugøta |
| Petra Mikkelsen | á Lækjuni | Syðrugøta |

Fremsta rað:

| | | |
|---|---|---|
| Johannes Husgaard | hjá Líggjasi | Syðrugøta |
| Elisa Víká | á Mýruni | Syðrugøta |
| Elly Jacobsen | á Teigum | Syðrugøta |

AGN

sild
tobis
kúfiskur
makrelur
høgguslokkur



...dagligt samband um alt landið

P/F KAMBUR

STRENDUR
telefon: 448095 · fax: 448744

BAADER

Vit hava eykalutir á goymslu og útvega teir, vit ikki hava.

Pf. Petur Larsen

Tlf: 44 41 74
Fax: 44 42 85

Vitja eisini heimasíðuna hjá Føroya Fiskimannafelag: www.fiskimannafelag.fo

FF blaðið
BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Nr. 361 - 23. februar 2006

Nr. 287 - 20. februar 2003

FF blaðið

**Svarið frá Karsten Hansen um frádrátt hjá føroyskum fiskimonnum við útlendskum fiskiskipum**



## Soleiðis virkar tingið sum eftirlitsskipan

Samb. stýrisskipanarlógina hevur løgtingið eftirlit við virkseminum hjá landsstýrismonnum. Eitt av tólunum í hesum eftirliti er møguleikin hjá tingmonnum at seta landsstýrismonnum fyrispurning um ávís mál.

Hetta hevur eisini verið roynt í tí málinum, sum vit hava útgreinað her í blaðnum og í ársfrágreiðing FFs um skattin av vistarhaldi hjá sjófólki. Sum vit hava nevnt fyrr hevur viðgerðin av hesum máli frá byrjan av verið merkt av, at allar rættarreglur eru settar til viks fyri at forða borgarunum at fáa eina "fair" viðgerð av hesum máli. Her er svarið endurgivið.

Her skal bert takast fyrsta punktið fram. Restin er jú hareftir. Her sigur Karsten sigur:

**Um ein sjómaður fær frítt vistarhald umborð, so skal hann ikki skattast av hesum fría ágóða, hetta stendur beinleiðis ásett í § 29, nr. 11 í skattalógini.**

Hetta verður so nýtt sum grundarlag fyri ta niðurstøðu, at har vistarhald ikki er frítt skal tað skattast, og tað er hetta sum málið snýr seg um.

Sum tað sæst verður hetta sett fram sum eitt beinleiðis citat av einum ávísum stk. í eini ávísari grein í skattalógini. Men hetta stendur yvirhøvur ikki. Tað sum stendur í skattalógini er fylgjandi:

**§ 29. Til skattskylduga inntøku teljast ikki:**
**11) virði av vistarhaldi hjá sjófólki umborð**

Her sæst, at tað sum Karsten segði standa í lógini stendur als **ikki** í skattalógini. Her stendur einki um **frítt** vistarhald ella **frían** ágóða, sum er grundarlagið fyri páhaldinum hjá Toll og Skatt.

Her er talan um eina snaring av lógartekstinum til skaða fyri fiskimenn, sum løgfrøðingar á Toll og Skatt hava gjørt, hóast orðingin í lógini er púra greið, og eingin ivi hevur verið um tulkingina í 40-50 ár. Ein slík snaring verður endurgivin fyri tinginum, sum at hetta var sjálvur lógarteksturin.

Tískil var talan um eina beinleiðis villleiðing av løgtinginum, sum í einum skipaðum samfelag hevði fingið avleiðingar fyri viðkomandi landsstýrismann.

Men ikki í Føroyum. Hetta svar við tess citatfalsan fór framvið uttan at nakar gretti. Hetta vísir virðið løgtingið hevur sum eftirlit av virkseminum hjá landsstýrinum og harvið av hesi áseting í stýrisskipanarlógini. Tað er óneyðugt at siga, at við einum slíkum "teknikki" ber til at fáa gjørt eina og hvørja útlegging av eini og hvørji lóg. Av 32 tingmonnum er ikki ein tann einasti sum hevur nakað fortreð av tí.

Tí kann tað stórt sæð gera tað sama hvørja stýrisskipan vit hava. Tískil er rættarloysið "fullkomið.

FF-blaðið hevur rætt:

# Næstformaðurin í stjórnarskipanarnevndini gevur okkum viðhald

**Vit hava upp gjøgnum árini havt ein hóp av væl undirbygdum greinum, har víst hevur verið á tað politiskt fyriskipaða rættarloysi í Føroyum.**

Men allar hesar greinar hava verið burturtagdar av politisku skipanini og hennara fjølmiðlum. Ikki so mikið sum eitt av teimum málum, ið vit hava reist, hevur verið viðgjørd á nakran hátt.

Til hetta kunnu vera tvinnar frágreiðingar. Onnur kann vera hon, at tað er so lítið skil í tí, sum verður ført fram, at tað ikki er vert at taka upp á tungu.

Frágreiðingin kann eisini vera hon, at okkara skriving er so væl undirbygd, at best er at látast sum einki, so málini kunnu verða tagd í hel. Hetta er ikki ókendur taktikkur, tá nakað er sum ikki tolir dagsins ljós.

Men nú halda vit okkum hava fingið eina váttan um, at orsøkin til tøgnina er henda seinna frágreiðingin, og vísa vit til greinina hjá Kára á Rógvu aðra staðni í blaðnum. Samanumtikið kann sigast, at hann stórt sæð gevur okkum viðhald í teimum metingum, vit bóru fram í grein í blaði nr. 359. Greinin snúði seg um, hvussu stýrisskipanarlógin frá fyrsta degi hevur verið undirgrivin av sitandi løgtingsformanni saman við almennum løgfrøðingum.

Kári á Rógvu er ikki hvør sum helst. Neyvan nakar hevur fingist so nógv við stjórnarskipanararbeiði sum hann, og hann er í løtuni næstformaður í nýggju stjórnarskipanarnevndini.

Greinin hjá Kára talar fyri seg sjálva. Men her skal kortini verða gjørt eitt ískoyti.

### Formalisma fram um innihald

Tað var 1. apríl 1993, at táverandi landsstýri setti eina nevnd at gera uppskot til eina nýggja stýrisskipan. Slíkt arbeiði plagar at taka fleiri ár við luttøku av øllum avvarðandi pørtum í samfelagnum. Men longu minni enn 9 mánaðir seinni varð eitt álit handað løgmanni. Hetta álitið var ikki hissini til støddar, tað var ein bók upp á heilar 400 síður. Men tá hugt varð nærri at tí sást, at helvtin av innihaldinum var beinleiðis endurprent úr stýrisskipanum hjá øðrum londum, meðan stórur partur av restini vóru greinar, sum einki høvdu við stýrisskipanararbeiði at gera.

Stutt sagt var uppskotið hjá nevndini ein avskrift av donsku grundlógini frá 1849. Einsamøll er henda ikki nógv verd, men í Danmark hava teir ment hana við eini siðvenju og eini rættarfatan, sum ger Danmark til eitt av heimsins fremstu demokratisku londum.

Slíka siðvenju hava vit ikki, og fyri at nýggja uppskotið skuldi síggja út av nøkrum, vóru nakrar formellar reglur settar inn í tað, so tað á pappírinum skuldi síggja út sum, at okkara stýrisskipan varð meira fullkomin enn danska grundlógin. Ein regla var, at tað ikki ber til at vera tingmaður og landsstýrismaður samstundis. Ein onnur er, at tingmaður skal ikki vera limur í nevnd, sum var undir eftirliti av landsstýrinum. Hesar reglur skuldu eitast at vera eitt vatntætt skott millum løgting og landsstýri, og harvið skuldi eingin ivi vera um, at løgtingið veruliga hevði eftirlit við landsstýrinum.

Men tað kann staðfestast, at tað einasta, sum dentur verður lagdur á, eru tær formellu reglurnar, sum í veruleikanum ongan praktiskan týdning hava.

Eitt dømi um, hvussu ófullkomin stýrisskipanin er, sæst av, at ein partur av lóggávuarbeiðinum liggur lamið orsakað av einum akademiskum spurningi um, hvørt gjald til ALS ella barsilsskipanina skal roknast sum skattur ella ikki. Hesin spurningur skal metast út frá einum úr donskum týddum lógarteksti, sum er meira enn 150 ára gamal. Bert tað, at hetta kann gerast eitt trætumál, sigur nakað um "dygdina" á stýrisskipanarlógini. Hetta mál er væl og virðiliga kannað av 6 av okkara fremstu løgfrøðingum. Út frá hesum skuldi tað verið upplagt, at tingið tók endaliga støðu í hesum máli, inntil ein nýggj stýrisskipan forðar fyri, at slík ivamál skulu taka seg upp aftur. Hetta er sum so eitt lítið mál. Tað er hóast alt max. promillur talan er um. Slíkt brúkar formansskapurin í tinginum sínar kreftir uppá.

Eitt annað, sum Kári á Rógvu umrøður í Sosialinum 13. februar, er, at løgmansskrivstovan hevur koyrt løgtingsmenn og m.a. Lisbeth L. Petersen burtur úr eini nevnd, sum skuldi arbeiða við at fáa fleiri kvinnur upp í politikk. Avgerðin um hetta varð grundað á greinina í stýrisskipanarlógini um, at tingmenn ikki kunnu vera í nevndum, har landsstýrið hevur eftirlit.

Her er eisini talan um reina formalismu, sum ikki á nakran hátt hevur nakað endamál ella praktiskan týdning. Løgmaður sigur hinvegin, at hann má halda seg til stýrisskipanarlógina uttan mun til, um honum dámar hana ella ikki. Hetta er sjálvsagt rætt og prísverdugt. Og hevði løgmaður og annars politiska skipanin verið eins konsekvent í øllum málum, so stóð bara heilt væl til.

Men tað er beint mótsatt. Tað kann sigast við vissu, at ein av upphavsmonnunum til hesa reglu er tann sami, sum á løgtingsskrivstovuni eftir bílegging frá Edmund Joensen skrivaði tað notatið, sum vit umrøddu í næstseinasta blað. Her varð "staðfest", at tað ongan týdning hevði fyri eina tingviðgerð av einum tingmáli, sjálvt um løgmaður hevði givið tinginum skeivar løgfrøðiligar upplýsingar undir viðgerðini, t.v.s. um hann segði ósatt fyri tinginum. Málið snúði seg enntá um tulking av stýrisskipanarlógini. Hetta er beinleiðis í stríð við ta meginreglu í einum fólkaræði, at serliga ráðharrar siga satt.

Júst í hesum døgum hava danski forsætismálaráðharrin og uttanríkismálaráðharrin verið kroystir, tí teir høvdu sagt, at 11 árabiskir sendimenn høvdu verið á einum fundi, tá teir bert høvdu verið 8. Hetta sigur nakað um munin á hugburðinum.

Tað einasta sum hevur týdning hjá okkum er, at formellar reglur verða hildnar. Er talan um veruligt brot á eina stýrisskipan, so finst altíð ein útvegur fyri at fáa hesar blástemplaðar.

### Ósvaraði spurningurin: Var rækjuuppskotið í stríð við stýrisskipanarlógina?

Vit skulu endurtaka dømi um tann valdandi stjórnarliga hurlivasan. Bárður Nielsen, landsstýrismaður, slapp ikki at leggja uppskotið um "gjald" til rækjuflotan fyri tingið, tí tað sambært løgmansskrivstovuni skuldi vera í stríð við stýrisskipanarlógina. Nakað seinni legði Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, uppskotið fram, og nú var eingin, sum talaði um stýrisskipanarlógina. Uppskotið varð viðgjørt og sum so sett í verk uttan at nakar mukkaði, og tað varð enntá lýst í kunngerðablaðnum við undirskrift av tí sama løgmanni, hvørs skrivstova nakrar mánaðir frammanundan metti lógina at vera í stríð við stýrisskipanarlógina.

Hetta saman við nógvum øðrum dømum vísir ein fullkomnan lógarligan hurlivasa bert 10 ár eftir, at nýggja stýrisskipanin kom í gildi. Tað tykist als ikki at bera til at staðfesta, hvat stýrisskipanin sigur. Tí gera øll sum tað passar teimum.

Hetta er fyrst og fremst okkara egnu politikarum saman við avvarðandi "frøðingum" fyri at takka.

### Visión 2015 og gerandisdagur í 2006

Ein hevði væntað meira av sitandi løgmanni á hesum økinum. Ikki minst tá hugsað verður um, at javnaðarflokkar víða um heimin hava verið fremsta trygd fyri fólkaræði og rættartrygd. Her hevði hann eisini ein veruligan møguleika at umboða nýggjan politikk í mun til undanfarna landsstýrið, sum legði grundarlagið undir umrødda rættarloysi.

Men her er einki at vænta. Jóannes Eidesgaard hevur bert áhuga fyri formellum viðurskiftum, t.v.s. sjálva fasaduna. Tað verður nógv tosað um visión 2015, og her verður bert tosað um vælferð. At hava eitt skipað rættarsamfelag hevur ongan áhuga.

Her verða eingi stig tikin fyri at verja borgararnar móti valdsmisnýtslu. Søgan um vistarhaldið hjá sjófólki er bert eitt dømi um hetta.

# Føroyingarnir við Góðanes

Í næstseinasta blaði høvdu vit eina frásøgn um íslendska trolaran "Góðanes" sum sigldi á Flesjarnar fyrst í 1957 og sakk. Vit høvdu tá eina mynd av manningini, har nakrir av føroyingunum vóru við.

Vit hava nú fingið staðfest hvørjir teir vóru. Teir eru allir í aftara raðnum. Nr. 3 f.v. er Johannes H. Petersen úr Rituvík. Nr. 5 f.h. er Anthon E. Petersen, Runavík, og nr. 4 f.h. er Eivind Gudmundsson av Glyvrum.



*Hendan myndin varð tikin á sjómansheiminum í Havn aftaná bjargingina. Her síggjast:*
***Fremst f.h.**: Høgni Jónasson, Jón B. Jónsson, Guðmundur Sigurðsson, Magnus Skarpheðinsson, Guðmundur Helgason, Kristján Vilmundarson og Ingvar Bjarnason.*
***Aftast**: Finnbogi Finnbogason, Axel S. Óskarsson, ókendur, Guðmundur Vestmann, Emil Ásgeirsson, Jónas Hólm, føroyingur, føroyingur, Sigurríkur Ormsson, Gils Sveinsson, Sigurjón Jónsson.*

*Halldór Halldórson er eisini í hesi røð, men vit hava ikki fingið staðfest hvar.*
*Teir føroyingar, sum vóru við "Góðanes", vóru hesir:*
*Ólavur Debes, Havn, Andreas Hilduberg, Fuglafjørð, Kaj Johannesen, Lorvík, Johannes H Petersen, Rituvík, Ole J Bech, Tórshavn, Anthon E Petersen, Runavík, Eivind Guðmundsson, Glyvrar.*
*Hvørjir av teimum eru á myndini?*


T Ó R S H A V N A R K O M M U N A



## Dagrøktarar

### Dagrøktarar til Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir eftir dagrøktarum at byrja skjótast gjørligt.

**Vit bjóða**
- eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tað heimliga umhvørvið hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- hollan stuðul frá kommunualu skipanini.
- at ein triðingur av lønini verður skattafríur.

**Vit vænta at**
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- hølini har børnini verða ansað eru hóskandi
- møguleikar eru fyri uttandura virksemi

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála við Starvsmannafelagið og Kommuna Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marjun Midjord, dagrøktarleiðara tlf. 302010, lokal 1089, teldupost marjun@torshavn.fo ella við at fara inn á heimasíðuna www.torshavn.fo/leysstorv

**Umsókn**
saman við royndum, upplýsingum um útbúgving og møguligum viðmælum skulu sendast Dagrøktarskipanini, Postboks 32, 110 Tórshavn

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

**www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni**



NORA
NORDISK ATLANTSAMARBEJDE

## PROJEKTSTØTTE 2006

NORA indkalder hermed ansøgninger om støtte til projekter, der fremmer erhvervssamarbejde mellem Færøerne, Grønland, Island og Norge.

Der prioriteres ansøgninger inden for

Skaldyr
Projekter, der på bæredygtig vis bidrager til at styrke et nordatlantisk samarbejde omkring skaldyr. For eksempel produktion af skaldyr som ny ressource, akvakultur af skaldyr, muligheder for produktion i småsamfund, økonomisk betydning, udvikling af teknologi og marked.

Der kan endvidere ansøges inden for NORA's øvrige arbejdsområder:

Marine ressourcer
Projekter, der på en bæredygtig vis bidrager til optimeret anvendelse af eksisterende ressourcer, biprodukter, bioteknologi og marint baserede fødevarer

Turisme
Projekter, der understøtter bæredygtig udvikling af kultur- og naturbaseret turisme i de nordatlantiske lande.

Informations- og kommunikationsteknologi, IKT
Projekter, der bidrager til anvendelse af IKT til udviklingen af de nordatlantiske samfund.

Øvrigt regionssamarbejde
Projekter, der bidrager til styrkelse af de nordatlantiske småsamfund.

Støtte ydes fortrinsvis til virksomheder eller virksomheder i samarbejde med forsknings- og udviklingsorganisationer. Der kan støttes netværksopbygning, hovedprojekter, forskningsorienterede forprojekter, projektudvikling til bl.a. Nordlige Periferi Program. NORA ser endvidere gerne ansøgninger, der inddrager partnere i det nordlige Skotland og Canadas Østkyst.

Støtte kan ydes i max. 3 år og kun som delfinansiering, idet det er en forudsætning, at der ydes anden finansiering til projektet. Der skal indgå partnere fra mindst to lande i projektet.

Ansøgningsskema udfyldt på dansk, norsk eller svensk kan hentes fra NORAs hjemmeside www.nora.fo og indsendes i elektronisk form til:

NORA, NORDISK ATLANTSAMARBEJDE
Bryggjubakki 12 – Box 259 – FO-110 Tórshavn
Tel: +298 353110 – Fax: +298 353101 – nora@nora.fo

**Ansøgningen skal være os i hænde senest den 3. april 2006.**

Yderligere oplysninger kan fås ved henvendelse til ovenstående adresse.



FF-blaðið
www.fiskimannafelag.fo

# Virkisvitjan í Íslandi

Í farna mánað var ein bólkur frá Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna í Íslandi á eini kanningarferð, har teir vitjaðu eitt flakavirki. Vit halda frágreiðingina vera sera viðkomandi hjá okkum eisini, ikki minst í samband við kryvjing á landi.

Í sambandi við verkætlan okkara á Fiskivinnuskúlanum, sum gongur út uppá at framleiða feskar úrdráttir úr fiski, vóru vit á vitjan á íslendska fiskavirkinum Festi á Hafnarfirði. Framleiðsluútgerðin, teir nýta, er hátøknilig, og er hon framleidd av íslendsku fyritøkuni Skaginn, í samstarvi við FJM í Runavík.

Orsøkin til, at hesin túrurin kom í lag var, at projektleiðarin hjá FJM í Runavík, Arni Carlsen, bjóðaði okkum til Íslands at vitja hetta virkið. Eftir at hava ráðført okkum við skúlastjóra okkara, Jákup Andreasen, gjørdu vit av, at um vit megnaðu at fáa fígging til túrin, so skuldu vit fara avstað. Vit ringdu runt til nakrar fyritøkur og onnur fyri at vita, um tað var møguligt at fáa stuðul til ferðina. Hetta gekk sera væl, og tað tók bert fáar dagar at savna nóg mikið av peningi til ferðina.

Hendan linjan, sum er uppsett á Festi, er tann fyrsta av sínum slag og hon er sera framkomin.

FJM úr Runavík samstarvar við Skaginn í menningini av hesi framleiðslulinju, og tá vit vitjaðu, vóru tríggir føroyingar á virkinum og arbeiddu við maskinuni, teir vóru Arni Carlsen av Toftum, Hjalti Joensen úr Runavík og Páll Fagraberg úr Havn. Tað, sum FJM arbeiðir við í hesi verkætlanini, er at menna skannaran, sum avmyndar flakið. Hesin skannarin lesur av, hvar beinini eru, t.d. kílin, sendir boðini til telduna, sum stýrir "Cuttaranum", sum so sker eftir hesum. Eisini avmyndar og skrásetir skannarin blóðplettir og sandmaðk. Arni hevur mest við konstruktión at gera, Páll programmering og Hjalti elektrisku og elektronisku stýringarnar á maskinuni.

Tá ið vit vitjaðu á Festi, tosaðu vit við stjóran Asbjørn og virkisleiðarin Petur, sum báðir greiddu frá og svaraðu spurningum, ið vit settu teimum. Virkisleiðarin vísti okkum runt á virkinum og greiddi okkum frá framleiðslugongdini á virkinum.

### Fyrimunir við Skaginn prinsippinum:

Tað eru tveir avgerandi munir við hesi framleiðslulinjuni í mun til aðrar, tann fyrri er, at fløkini við einum CBC-kølara verða undirkøld, og tann seinni er slóðbrótandi "Water Jet Cuttarin".


*Fiskurin verður støddarskildur til kryvjing.*


*Teir kryvja fiskin.*


*Livurin verður tikin frá.*


*Kruvd hýsa á goymslu.*


*Water Jet Cuttarin.*


*Arni við einum undirkøldum flaki.*


*Teir viga og pakka undirkøld fløk.*


*Tær leggja í hýsufløk CBC-kølaran.*


*Toskafløk í laka til einkultfrysting.*


*Einkultfryst hýsufløk í "Scanbingju".*

CBC-kølarin kølir flakið niður á ein temperatur, sum liggur ímillum –1 til –2 ºC. Hetta ger, at enzymaktiviteturin í flakinum minkar munandi, og tí gongur eisini niðurbrótingin av fiskinum nógv seinni. Tí heldur flakið sær munandi longri enn vanligt ísað flak, uml. 4-5 dagar longri. Stjórin, Asbjørn, segði okkum, at teir hava framleitt vøru mánadag, sum verður avskipað hósdag, og kemur so á franska marknaðin mánadag, eina viku eftir hon er framleidd, og vøran verður kortini seld sum fesk vøra við høgari góðsku.

Hin parturin er tað nýggja kollveltandi "Water Jet Cut" prinsippið, har ein robottur gevur møguleika at kílaskera flakið við eini vatnstrálu. Við hesum robotti kann ein eisini skera flakið sundur, júst sum ein ynskir. Á henda hátt ber til at optimera virðið á flakinum munandi, t.d. kanst tú skera tann dýrasta partin, nakkastykkið, burtur úr flakinum og selja restina sum eina "Baby Fillet", sum er eitt speglvent flak.

### Kryvja á landi:

Tað, sum teir á hesum virkinum hava lagt seg eftir, er at framleiða so góða og feska vøru sum yvirhøvur til ber, burtur úr toski og hýsu. Tí hava teir keypt seks útróðrarbátar og tveir snurrivod bátar, sum avreiða daggamlan fisk til virkið. Á henda hátt kunnu teir betur tryggja sær rávøru við hægstu góðsku. Við tað, at teir sjálvir eiga bátarnar, ber betur til at seta krøv til, hvussu fiskurin skal handfarast umborð á bátunum. Fiskurin verður blóðgaður niður í íslaka umborð, og kemur ókruvdur til lands. Fiskurin verður so í staðin kruvdur á virkinum, hetta gevur nógv betur møguleika at gagnnýta innvølir – so sum livur og rogn. Um fiskurin er smáttfallandi, taka teir ikki livur, tí livraprísurin í Íslandi er vánaligur (einans 3 kr. kg ímóti 5 kr. kg í Føroyum).

Vanliga verður fiskurin skildur í fýra støddir, tá hann verður kruvdur, soleiðis at tey, sum kryvja, kryvja hvør sína stødd.

Eftir at fiskurin er kruvdur, verður hann settur á goymslu í kørum við 25% íslaka, sum hevur ein temp. á –1ºC, í uml. 24 tímar. Hetta verður gjørt fyri at fiskurin skal taka



*Lættsaltaði toskafløk verða einkultfryst og pakkað í 11 kg eskjur.*




*Eskja til flogfrakt.*



*Undirkølt toskaflak.*



*Fiskurin kemur inn á trimmibandið.*



*Fiskurin verður stoyttur inn á bandið.*




*Undirkøld fløk í 660 l kari til útflutning sjóvegis.*

vætu í seg fyri at økja um vektina, og at trekkja blóð úr fiskinum, fyri at fáa hann hvítari.

Trimming og CBC-køling:
Fiskurin verður flakaskorin við eini Baader 189, og fer síðani til "trimming". Her verða fløkini hampað. Eftir hetta fer flakið ígjøgnum eitt sokallað "Pre Chill", sum er ein –1ºC kaldur 3% saltlaki, hendan prosessin tekur uml. 20 min. Hetta verður gjørt fyri at økja um vektina, trekkja blóð úr flakinum, fáa tað hvítari og fyri at køla tað niður. Flakið verður síðani lagt í CBC-kølarin, har tað verður kølt niður til –1 til –2 ºC, hetta tekur uml. 8 min.

Water Jet Cutting:
Tá flakið er komið úr CBC-kølaranum verður tað "scannað", og boð verða send til telduna, ið stýrir "Water Jet Cuttarinum", sum síðani sker tann skurð, maskinan er programmerað til. Teir hava fýra "Water Jet Cuttarar", sum tilsamans klára at skera 60 fløk um minuttin, hetta svara umleið til tað, sum ein flakamaskina megnar at skera. Eftir hettar fer flakið gjøgnum skrædlaran, og síðani pakkað. Til ber at gera eitt sokallað "Smart Cut", sum gongur út uppá at skera nakkastykkið (sum er tann dýrasti parturin av flakinum) frá, og eftir er eitt flak, sum verður kallað "Baby Fillet". Nakkastykkið á toski hevur ein prís á uml. 65-70 kr kg, og "Baby Fillet" hevur ein prís á uml. 45 kr kg.

Eisini er møguligt at portiónskera fisk við "Water Jet Cuttaranum", og hjá Festi er ætlanin í framtíðini at skera steinbít á henda hátt.

Undirkøldar vørur:
Framleiðslan, teir hava í løtuni, er bæði undirkøld og einkultfryst fløk við skræðu. Tað undirkølda flakið verður pakkað, antin sum flogfrakt, í 3 kg eskjur, ella til sjóvegis flutning, har tað verður koyrt í 5 kg posar, og síðani í 660 l. kør. Ein fyrimunur við undirkøldum flaki er, at ein nýtist ikki ís til at køla við, flakið er kølielement í sjálvum sær. Hetta ger, at ein bert útflytur flak og ikki ís, og tí er nógvur peningur at spara í flutningskostnaði.

Frystar vørur:
Tann fyrra dagin, vit vitjaðu, arbeiddu tey fisk frá snurrivodbátunum. Hesin fiskur hevur ikki eins høga góðsku sum útróðrarfiskur, tí bleiv ein stórur partur av hesum fiski einkultfrystur og pakkaður í "scanbingjur". Teir framleiða eisini lættsaltað toskafløk til spanska marknaðin, hesi fløk verða einkultfryst og pakkað í 11 kg "catering" eskjur, hetta verður alt útflutt sjóvegis. Vit spurdu um prís á hesi vøru, og fingu at vita, at hann var í lagi.

Einkultfryst hýsufløk og lættsaltað einkultfryst toskafløk er ikki tað, sum gevur besta prísin, hetta verður bert gjørt, um góðskan ikki er nóg góð til kølda framleiðslu.

Umhvørvisvinarligar kassar:
Teir ganga meiri frá flamingokassum, sum taka



*Plattur klárur at senda við flogfari.*

nógv pláss á goymslu, og eru dýrir at burturbeina. Í staðin eru teir farnir yvir til hesar nýggju kassarnar, sum eru gjørdir úr Poly Propan. Hesir kassar taka lítið pláss, eru umhvørvisvinarligir og kosta einki at burturbeina. Kassarnir verða framleiddir í Grimby í Bretlandi, tað er íslendska fyritøkan Sammhentir, ið innflytur kassarnar.

Hvítur fiskur:
Asbjørn greiddi okkum eisini frá, at onkrir av kundum teirra hevði havt illgruna um, at teir nýttu tilsetingarevni fyri at fáa fiskin hvítan, men hetta hevði hann afturvíst og greitt teimum frá, at orsøkin til, at fiskurin var so hvítur er, at hann verður blóðgaður niður í ísvatn umborð, og ikki kruvdur fyrr enn hann kemur til lands. Hesir kundar høvdu síðani kannað fiskin og høvdu einki illgrunasamt funnið, síðani vóru teir komnir við eini umbering. Hann fortaldi okkum eisini, at teir høvdu havt eitt sindur av trupulleikum av fiskinum hjá snurrivodbátunum, tí hann var nakað reyður. Hetta kom av, at fiskurin kemur undir ov stórt trýst, tá ið stórir posar verða tiknir inn í einum. Hesin trupulleikin er nú loystur á tann hátt, at teir taka smærri nøgdir inn, enn teir áður gjørdu.

Fiskurin væl viðfarin:
Eitt, sum vit løgdu til merkis var, hvussu væl fiskurin bleiv viðfarin, tá hann bleiv stoyttur úr karinum, bæði til kryvjing og til avhøvdaran, fiskurin verður næstan lagdur inn á bandið, sum tekur frá. Hetta er heilt vist við til at minka um vandan fyri, at fiskurin fær skaða undir framleiðsluni, og vísir eisini, hvussu tilvitaður ein er um góðsku gjøgnum alla framleiðsluna. Tað sama er galdandi, tá ið fiskurin fer frá flakamaskinuni inn á trimmilinjuna, har fiskurin verður lagdur inn á trimmilinjuna við einum teleskopbandi, sum fer sera væl við flakinum.

Bæði loft og sjóvegis útflutningur:
Vanligt er, at teir framleiða mánadag, týsdag og mikudag til loftvegis flutning, og hósdag og fríggjadag til sjóvegis flutning. At útflyta loftvegis er sera kostnaðarmikið, prísurin liggur um 10 kr/kg, og vanligt er, at seljari og keypari bera hesa útreiðslu. Sjóvegis flutningur er nógv bíligari, uml. 2 kr/kg til Bretlands, tí royna teir, í tann mun tað letur seg gera at útflyta sjóvegis.

Útlendsk arbeiðsmegi:
Á virkinum arbeiða næstan bara útlendingar – so sum pólendingar, kinverjar og fólk úr teimum baltisku londunum, meðan fólkið í leiðandi størvunum eru íslendingar. Tímalønin er lág samanborið við okkara, umleið 60 kr um tíman, men afturat hesum hava tey hava eina bonusskipan. Tað verður arbeitt, tá fiskur er á virkinum, og koma bátarnir t.d. inn leygardag, verður arbeitt tá.

Niðurstøða:
Við hesi framleiðslulinju er møguleiki fyri at spara fólk í reinskeringini, sum er ein stórur útreiðslupostur í framleiðsluni. Tó skal ein framvegis nýta fólk bæði til "trimming" og eftirlit, tí maskinan klárar ikki at taka burtur sandmaðk, blóðplettir og annað, men tó skrásetir hon hetta. Hinvegin fæst ein nógv betri vøra við javnt høgari góðsku, sum gevur væl hægri prís. Við at føra rundan fisk til lands, er eisini nógv betri møguleiki fyri at gagnnýta alla ráværuna, so sum livur, rogn o.a. Hetta má vera rætta leiðin at ganga í framtíðini, nú kappingin úr láglønarlondunum er alsamt vaksandi.

Í framtíðini verða vit noydd at leggja okkum meiri eftir at framleiða feskar úrdráttir, tí brúkarin gerst alt meiri tilvitaður um tað hann etur, og tað er har, vit hava besta møguleikan at standa okkum í kappingini. Tá vit tosa um sjóvegis flutning, eru vit eitt samdøgur nærri marknaðinum enn íslendingar, og eigur hetta at geva okkum fyrimun bæði í flutningsprísi og góðsku. Loftvegis eru vit kanska ikki so væl fyri, av tí at stór farmaflogfør ikki kunnu lenda í Vágum, men tó eru tað onkur minni flogfør, sum kunnu lenda har. Tað tekur tíð at byggja slíka rutu upp, men um fleiri framleiðarar, útflytarar og innflytarar stóðu saman um hetta, skuldi hetta verið møguligt.

Í Føroyum hevur nógv verið tosað um leveringstrygd, men á hesum virkinum, sum vit vitjaðu, var tað ikki altíð, teir fingu levera til tíðina. Orsøkin til hetta var, at bátarnir, teir eiga, eru smáir, og tí fáa teir ikki altíð roynt, vegna vánaligt veður. Men av tí at teir høvdu eina vøru, sum hevði framúr góðsku, hevði tað eydnast teimum at fáa kundan at góðtaka hetta, og vildi fegin bíða til teir høvdu fisk aftur.

Vit vilja takka øllum, sum stuðlaðu okkum fíggjarliga til hesa ferðina. Ein serlig tøkk til Arna Carlsen og Hjalta Joensen, sum vóru sera hjálpsamir og tolnir, uttan teir var ferðin ongantíð vorðin veruleiki.

*Vestmanna, tann 2. februar 2006*

**Marnar Pattinson**
**Linda Johannesen**
**Jógvan Martin Hansen**

# Hýsuprísurin á veg upp aftur

Góða veðrið seinastu dagarnar hevur haft við sær, at fleiri útróðrarbátar hava verið úti og roynt. Tað hevur verið væl av fiski at fáa, og prísirnir hava hildið seg nøkulunda.

Sjálvt um hýsuprísurin fall nakað í byrjanini av februar mánaði, so sæst á prísgongdini á Fiskamarknaðinum, at prísurin á veg uppeftir aftur.




"Eftir tí vit hoyra á marknaðinum, verður rokna við at hýsuprísurin í Bretlandi fer at fara upp, og serliga á tí smáu hýsuni" sigur Oskar Joensen uppboðssøluhaldari við FF-blaðið.

Várróðurin

Tað sær út, sum at várróðurin so spakuliga er byrjaður og nakað av bátum eru farnir norðurum.

Gamalt var, at toftabátanir fóru norðurum umleið 20. februar, og onkur er farin.

Línubátarnir

Línubátarnir, sum eru úti, hava rímiligt av fiskarí, og rokna verður við, at teir koma inn í endanum av februar. Streymurin er nevniliga harður í mánaðarskiftinum februar/mars. Tað sær eisini út, sum um at línubátarnir eru byrjaðir at taka livur, og tað er at fegnast um.

**Gerst haldari fyri bert 250 krónur um árið og fá meira fyri minni tvær ferðir um mánan**




T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

**Leys størv**

**Stella Maris vøggustova**

Søkir eftir einum sjúkra- og feriuavloysara at arbeiða, fyri starvsfólk í feriu og- ella vegna sjúku, at byrja 6. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknarfreist:** Hósdagin 23. februar 2006.

**Setanarviðurskifti:** Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Reingerðarfólk**

Tórshavnar kommuna søkir eftir reingerðarfólki til Tórshavnar Kommunuskúla, at byrja 6. mars 2006. Arbeiðstíðin er tríggjar tímar um dagin, tá skúlin er opin. Áhugaði verða biðin um at seta seg í samband við húsavørðin, tel. 212383.

**Umsóknarfreist:** Mánadagin 27. februar 2006.

**Setanarviðurskifti:** Starvið verður sett sambært sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag.

**Les meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

*Bjargingarútgerð*

*á sjógvi og landi*

*Vit bjóða tað besta innan bjargingarbátar, bjargingarvestar, eldsløkkiútgerð, bjarginar og trygdarútgerð. Umboð fyri kenda danska merkið "Viking".*



- *Bjargingarbátar*
- *Bjargingarnet*
- *Yvirlivilsisdraktir*
- *Flótidraktir*
- *Bjargingarvestar*
- *Bjargingarkransar*
- *Epirbar/neyðsendarar*
- *Radartranspondarar*
- *Eldsløkkjarar*
- *Eldávaringar*
- *Branddraktir*
- *Umvælingar*
- *Eftirlit*

**P/F Gummibátatænastan**

Mannaskarð 4, Postboks 3223, 110 Tórshavn
Tel. 31 49 13, Fax 31 06 56, E-mail: gummibad@post.olivant.fo

# Blákrossheimið

Blákrossheimið er ein viðgerðarstovnur fyri rúsdrekka- og rúsevnismisnýtarar og avvarandi teirra.

Hevur tú ella onkur tú kennir trupulleikar við rúsdrekka ella rúsevnum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Blákrossheimið á tlf. 315575, sum svarar alt samdøgrið.

***Vit kunnu m.a. bjóða...***

- *avrúsan og viðgerð*
- *einstaklinga samrøður (ambulant viðgerð)*
- *samrøður saman við familjuni (familjuviðgerð)*
- *eftirviðgerð - búpláss í búfelagsskapi*

Øll starvsfólkini á Blákrossheiminum eru yrkisfólk og alt fer sjálvandi fram í trúnaði.

***Vit vilja fegin hjálpa tær***

**Blákrossheimið** FO-100 Tórshavn
Lynggøta 12 Tlf. 31 55 75

**Tær bestu og bíligastu loysnirnar uppá**

| | |
|---|---|
| GDMSS-Radioútgerð | Furuno/Silor/JRC/I-Com |
| Radar við ARPA og Plottara | Furuno/Simrad/JRC |
| Ekkolodd-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Sonara-útgerð | Furuno/Simrad/kaio- |
| Navigatións-útgerð | Furuno/Simrad/JRC |
| Navigatións Plottara | Furuno/MaxSea/Simrad, Sodena |
| Autopilot - stór og lítil skip | Furuno/Robertson/Sperry |
| Autopilot - til bátar | Timco |
| Satellite Kumpass - 3xGPS | Furuno |
| Satelitte - Navigation | Furuno/Simrad/JRC |
| Satelitte - Kommunikations | Furuno/T&T/Sailor |
| Satelitte - Sjónvarp | Applied/Sea Tel |
| Trol-sensorar og kabinett | Scanmar/Simrad |
| Gyrokumpass | Sperry/C-Plath/Anschutz |

**Søla og service:**
*Sjálvandi hava vit útgerð til GMDSS SÝN og Service, sum vit eisini gera*

***Sp/f Contrive Jsp Ltd.***

**FO-700 Klaksvík, Tlf.: 455244 - 214244, Fax: 456945**

# MAN B&W Diesel A/S

Umboðið · Ernst Reinert

**Alpaha Diesel** motorar og eykalutir

Undir Glaðsheyggi 10
FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tlf: +298 31 33 84 · Fax: +298 31 30 64

## Sofus Poulsen, 5. partur:

**At taka úr blaðnum**

**Síðurnar 9, 10, 15 og 16 kunnu takast úr blaðnum**

# Um læknar, jarðarmóður og tuberklar

Vit hava framvegis áhugavert tilfar hjá Sofusi Poulsen, okkara manni í Aberdeen í hálva øld. Áhugaverdar sendingar í Útvarpi Føroya av sendingum, sum vóru í Danmarks Radio eftir kríggið, hava givið Sofusi íblástur til hesar hugbirtingar.



*Sofus.*

Hoyrdi eina sera áhugaverda sending í Útvarpi Føroya um jólini. Hetta var ein upptøka, sum Danmarks Radio gjørdi í Føroyum beint eftir krígslok í 1945.

Henda sending fekk minni mítt at leita aftur til hesa tíðina og tað, sum eg minnist um hana. Eg havi búleikast í flestu av umrøddu plássum.

### Dr. Stærmose

Tá ið meginparturin av hesi upptøku var um Dr. Vagn Stærmose, sum var yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og kommunulækni, so fari eg fyrst at siga frá tí, sum eg minnist frá teirri tíðini, eg búleikaðist í Klaksvík.

Dr. Stærmose var ein sera væl umtóktur lækni, bæði sum kommunulækni og skurðlækni. Hann noyddist ofta at fara til útoyggjarnar við læknabátinum "Medicus", sum eg eisini minnist væl til. Martin í Toft Simonsen, skipari, greiddi frá, at báturin gekk 9 míl, men hetta var eftir, at hann fekk nýggjan motor, og hann gekk skjótt. Eg minnist hann koma grøvandi inn eftir vágni í Klaksvík. Teir báðir Martin og Hans Pauli Klein, sum mannaðu "Medicus", vóru sera fryntligir menn. Ikki var altíð so tespiligt at fara í læknaørindi í óveðri, og nógv varð lagt fyri, tá ið læknahjálp var fyri neyðini. Umframt fyrrnevndu størv, var Dr. Stærmose eisini skúlalækni, og plagdi hann at vitja skúlan at kanna børnini, tá ið okkurt serligt var á vási. Nevnt var í upptøkuni at hann eisini var lækni hjá hermonnunum, og tað minnist eg eisini. Einaferð eg var og vitjaði Dr. Stærmose sum kommunulækna, vóru nakrir hermenn har, og umframt teir var eisini gamli Jógvan Heinesen, Elduvíks Jógvan. Hann byrjaði at tosa við hermenninar og



*Vagn Stærmose, sum var yvirlækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi umframt at vera kommunulækni eisini.*

greiddi teimum frá, at hann hevði starvast í Skotlandi, har hann arbeiddi við at gera "Pit Props". Hesi vóru brúkt sum stúttir í kolaminum fyri at halda loftinum uppi, so tað ikki skuldi detta niður á kolminuarbeiðararnar. Hann tosaði enskt við eini sterkari skotskari dialekt og var í føroyskum koti.

Minnist eisini, at Dr. Stærmose roykti pípu og hevði einar 6 pípur liggjandi í eini stórari skál á borðinum. Tað er neyvan nakað, ein sær hjá læknum í dag. Umframt Dr. Stærmose var eisini Dr. Lage lækni í Klaksvík undir seinna heimsbardaga, teir vóru báðir fittir menn. Dr. Stærmose giftist við Helenu, dóttir Alexander Enniberg yvirlærara, og Dr. Lage giftist vist við einari av Waag ættini í Vági í Klaksvík.



*Læknabáturin "Medicus".*

### Óli í Skúla stjórnaði sjúkrahúsinum

Vælkendi politikarin og handilsmaðurin O.F. Joensen, var fyristøðumaður á sjúkrahúsinum og hevði eisini við "proviantin" til sjúkrahúsið at gera. Hetta var ikki bert kjøt og fiskur, men eisini fuglur. Eg minnist væl, at fleiri tunnur av saltaðum lundabringum vóru í kjallaranum í handlinum hjá O.F. Joensen. Eg plagdi at hjálpa til hjá honum. Fekk so eisini tað arbeiði at taka upp í einar tvær spannur av lundabringum eina ferð um vikuna, og at lata tær vatnrenna náttina yvir, fyri síðani at bera tær niðan á sjúkrahúsið dagin eftir. Hetta var døgurðamatur til bæði starvsfólk og sjúklingar.

Gamla sjúkrahúsið varð nýtt sum sinnissjúkrahús undir seinna heimsbardaga. Tað kundi ofta vera heldur ógvusligt at ganga ígjøgnum gongina har vegna teir neyðars sjúklingarnar, ið ikki altíð vóru so "friðarligir". Tá í tíðini fingu teir ikki ta medisinhjálp sum er tøk nú á døgum. Seinni vóru nakrir av sjúklingunum sendir niður til Leith-Edinburgh við einum krígsskipi. Minnist meg rætt fór Anna Joensen, sjúkrasystir, systir próst Joensen, niður til Edinburgh við sjúklingunum, og vórðu teir innlagdir á sinnissjúkrahús har.



*Constansa og Óli.*

### Constansa fekk lív í barnið

Fosturmostir mín Constansa Joensen, jarðarmóðir á Kalsoynni á Syðradali, misti fyrra mannin George Olsen við "Immanuel" í 1932 eins og eg misti pápa mín við sama skipi. Hon bleiv gift upp aftur við Óla Joensen, bónda á Syðradali, sum tíverri datt oman undir krígnum, tá ið hann var á fjalli við Húsamonnum. Hann var álvarsliga skaddur, breyt beinini o.a. og bleiv fluttur á sjúkrahúsið, har Constansa hjálpti Dr. Stærmose at viðgera Óla, men hann var so illa farin, at hann doyði av løstunum.

Constansa gjørdist seinni bæði bóndi og fýrpassari umframt eisini at vera jarðarmóðir. Hon var nógvar vandaferðir í starvinum sum jarðarmóðir. Eitt nú at fara til Trøllanes á vetrardegi. Tá var hon bundin ímillum tveir menn, har annar gekk frammanfyri og hin aftanfyri hana. Ja, slíkar vóru konubrot, sum neyvan finnast í dag, nú bæði vegir, tunlar og tyrlur gera arbeiðið lættari og minni hættisligt.

Skal bert nevna um eina hending hon hevði í hesum starvið. Tað var ein ung kona, hugsi hon var av Húsum og einkarbarn. Foreldrini høvdu bíðað í spenningi at fáa sítt fyrsta abba- og ommubarn, men tað gekk ikki væl í hond. Konan bleiv flutt á sjúkrahúsið, og tey gjørdu alt, tey kundu fyri at bjarga hesum lítla dreingjabarninum, men har sá tíverri ikki út til at vera meira at gera. Constansa visti sjálvandi, hvussu til stóð, bæði heilsuliga og í aðrar mátar, og hon fór so at arbeiða upp á hetta neyðars nýfødda barnið, og tað gjørdi hon í fleiri tímar, og til alla Guds lukku eydnaðist tað henni at fáa lív aftur í barnið.

Eitt tað seinasta eg minnist Constansu gera fyri mammu, var sum ljósmóður, tá ið Ruth systir var fødd í Klaksvík undir krígnum.

Seinastu ferð vit bæði Nessie hittu Constansu var umborð á gomlu "Norrönu" í Leith, tá ið hon var á páskaferð saman við ca. 700 ferðafólkum, sum vóru við á ferðini til London og Leith í 1984.

### Tuberklarnir

Dr. Stærmose nevndi eisini sjúkur, sum plágaðu føroyingar, tey árini hann starvaðist í Norðoyggjum. Tað vóru serliga tuberklarnir, sum nógv høvdu, og vóru hesir umleið 30% av

*Framhald á næstu síðu*

sjúklingunum. Eg minnist væl at "pirkan" kom regluliga í skúlarnar at pirka børnini, fyri at kanna, um tey høvdu fingið "smittuna". Hetta varð gjørt á tann hátt, at tú fekk sprænt okkurt inn undir húðina á øðrum arminum og so rodnaði og hovnaði staðið, har hetta var gjørt. Nakrar dagar seinni komu tey aftur at máta, hvussu stórt "pluss" ein hevði fingið. Um henda pirkingin ikki rodnaði, men bert fór burtur, so mátti viðkomandi vaccinerast fyri at fáa smittuna í seg. Her kann skoytast uppí, at FF blaðið fer 6. apríl at hava eina frásøgn um "pirkuna" Marin Skipanes, sum verður 90 ár summarmáladag.

Minnist væl at mamma altíð "formanaði" okkum at halda okkum burtur frá fólki, sum hostaðu illa, tí tey vóru kanska sjúk av tuberklum og smittaðu. Hetta var nakað sum eisini fylgdi mær, tá ið eg var komin niður higar. Um onkur hostaði illa í t.d. einum bussi, so royndi eg altíð at halda ondini eina løtu ella at venda mær burtur frá tí sum hostaði. Í Føroyum vistu øll, hvussu ein kundi fáa smittuna, men her niðri vistu tey flestu einki um tuberklarnar. Tey søgdu vanliga, at øll vóru fødd við smittuni. Heima í Føroyum vóru tuberklar ein sjúka, sum øll ræddust, og eg minnist tíverri fleiri, sum blivu innløgd á Sanatoriið í Hoyvík, og sum ikki komu heim aftur í lívi. Sjómenn vóru smittaðir umborð vegna trongu umstøðurnar, og um onkur var teirra millum sum smittaði. Tíbetur varð seinni lógarfest, at allir sjómenn skuldu røntgenkannast eina ferð um árið fyri at fáa váttan um, at teir ikki vóru smittuberarar, og hesa váttan máttu teir hava við, tá ið teir skuldu mynstra við einum av okkara skipum. Hetta gjørdi sjálvandi ein stóran mun í royndunum hjá læknum o.ø. at basa hesi ræðuligi sjúku. Seinni kom heilivágur, sum tíbetur gjørdi enda á tuberklasjúkuni, sum vit høvdu kent hana frammanundan. Sanatoriið, sum í dag er studentaskúli, er prógv um hetta.

Barnalamningur var ein onnur "ræðusjúka" á mínum ungu árum. Hon gekk av og á, og úrslitið varð, at fleiri blivu lamin og nøkur doyðu av hesi sjúkuni. Minnist einaferð henda sjúkan gekk, at Constansa bað mammu og onnur geva børnunum ráan leyk uppá breyð, og hetta



*Óli í Skúla var bestýrari á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.*



*Bretar søgdu, at Pauli Dahl hevði komið á fremstu rók í London sum lækni.*



*Elduvíks Jógvan.*

hjálpti so í okkara familju. Men eg minnist eina konu, sum ikki vildi taka við ráðum frá Constansu, og ein dóttur hennara fekk barnalamning. Tíbetur hevur heilivágur eisini gjørt enda á hesi sjúkuni, sum flestu børn í dag lítið og einki kenna til.

### Heiðadoktari og Eiðisdoktari

Umframt læknar í Klaksvík, vóru eisini læknar í Saltangará, Dr. Einar Djurhuus, var føroyingur og Dr. Rasmussen, dani, á Eiði. Hesin seinni bleiv víðakendur, tí hann fann fram til havhestasjúkuna, sum serliga rakti barnakonur. Fleiri doyðu av hesi sjúku, sum antin menninir bóru heim við sær eftir at hava veitt havhest, ella konurnar fingu, tí tær høvdu roytt ella skrællað havhest. Eingin visti tá, hvussu vandafult hetta var. Men Dr. Rasmussen fyri at takka kom eisini vend í viðvíkjandi hesi sjúkuni.

Nógv verður tosað og skrivað í flest øllum londum í dag um reinleika á sjúkrahúsum og líknandi stovnum. Hetta var sjálvandi eisini ein trupulleiki fyrr, men tá varð ansað væl eftir, at øll og alt bleiv væl vaskað. At slíkt ikki verður so strangliga yvirhildið í dag, tykist at vera ein tann størsta orsøkin til, at sjúklingar verða smittaðir á sjúkrahúsum. Dr. Djurhuus var sera nærlagdur, hvat reinleika viðvíkti. Tá ið hann vitjaði sjúklingar runt um í sínum læknaøki, vistu fólk, hvat tey skuldu gera. Tey skuldu hava eitt fat standandi við heitum vatni, harafturat eina sápu og eitt reint handklæði, so hann kundi vaska hendurnar, bæði áðrenn hann fór inn til sjúklingin og áðrenn hann fór avstað aftur.

Minnist eisini hvussu reinlig summi fólk vóru. Sunneva, sum búði í Søldarfirði, men var ættað úr Sumba – hon var omma Eiler Jacobsen, skipara – hevði tvær kýr. Oftani hevði hon eisini mjólk, tá ið onnur onga høvdu. Eg var eftir mjólk hjá henni, hetta var undan seinna heimsbardaga, og hon skolaði og skoldaði altíð íløtini við kókandi vatni, áðrenn hon koyrdi mjólk í tey.

Tað er "stuttligt" at kunna minnast á slíkar hendingar. Annars havi eg altíð sjálvur havt lyndi til at ansa eftir, at reinleiki er har, sum neyðugt er. Her í Aberdeen var reinleiki ikki settur so ovarlaga, tá ið eg kom her niður. Tá ein keypti "Fish and Chips" fekk man tað serverað pakkað inn í avíspappíri. Eitt sum var enn verri, tað var, at sovorðið sum tomatir o.a. varð ikki vaskað, tá man fekk tað á matstovum saman við køldum kjøti.

Fyrr tá ið tey spurdu meg um, hvat eg hevði viljað ynskt at starvast við, um eg ikki hevði verið á Umboðsstovuni. Tá plagdi eg at svara "a sanitary inspector – and God help some of your hotels and restaurants".

### Dr. Dahl átti at verið í London

Danmark Radio hevði eisini samrøðu við Dr. Dahl, og greiddi hann frá um hospitalið í Havn og um sjúkur og sjúklingar. Dr. Dahl var ein av okkara bestu skurðlæknum. Eg minnist, at læknar hjá bretsku hermonnunum, sum høvdu sæð Dr. Dahl "in action" søgdu, at hann átti at verið serlækni í Harley Street í London, har teir bestu læknarnir í Bretlandi høvdu sínar privatu læknastovur.

Dr. Dahl var ein maður, sum tænti og gav sínum landsmonnum læknahjálp við tí læknadugnaskapi, sum Várharra hevði givið honum. Slíkir menn sum hann hava okkara hjartans tøkk uppibornað.

### Kommunulæknarnir í Havn

Kommunulæknarnir í Havn undir seinna heimsbardaga vóru Dr. Axel Poulsen, sonur Petur Snikk, sløjtlærara okkara, og búði hann í doktarahúsunum úti á Reyni. Hin kommunulæknin var Dr. Nielsen, ein donsk kvinna, sum búði í Quillingsgarði, har eisini Sápuhúsið var. Minnist, at hon eina náttina veturin 1945 varð



*Gamla og nýggja sjúkrahús í Klaksvík.*

boðsend at koma til mammu í slábrokki, tí mamma var so ring av meslingum, at hon mundi doyð. Hjarta hjá henni orkaði ikki allan fepurin og vildi svíkja og Dr. Nielsen gav henni heilivág.

Annars var Dr. Poulsen okkara lækni, so vælvild gjørdi seg eisini galdandi tá á døgum. Fosturpápin var farin niður til Aberdeen við "Liljuni" beint eftir krígslok, og hann meinti seg ikki at hava havt meslingar. So tá ið hann kom aftur, fóru vit báðir niðan til Dr. Poulsen, sum tók uml. ein kvart litur av blóði úr høvuðsæðrini í arminum hjá mær og sprændi tað í annað lærið hjá honum. Meslingar fekk hann so ikki.

Ja, nógvar broytingar til tað betra eru hendar innan læknatænastu. Og 3 sjúkrahús eru í Føroya landi í dag. Hetta er nakað sum øll áttu at verið takksom fyri.

### Meiaríið

Eg plagdi at hjálpa Kemma Klakk, soni Óla, á meiaríinum eftir skúlatíð. Eg dugdi eisini at "pasteurisera" mjólkina, sum kom við postbátunum "Immanuel" og "Leynarfossi" frá útoyggjunum. Oftani var óveður um vetrarnar. Tá ið bátarnir ikki kundu leggja at, og mjólkin ikki kundi flytast umborð við árabátinum, sum postbáturin sleipaði aftan á sær, so noyddust teir at stjóra 50 litra mjólkardunkarnar umborð. Eg skuldi so við einum desiliturmáti smakka á mjólkina fyri at kanna, um sjógvur var komin í hana. Tí um so var, noyddust vit at stoyta hana í rennuna. Mjólkin varð hitað upp til 67 hitastig, minnist meg rætt, í uml. ein hálvan tíma, so bleiv hon pumpað út og køld, og síðani stoytt í stór sylindaraformað íløt, sum so vóru flutt út í rúmið, hagani mjólkin varð seld.

Um vetrarnar var altíð mjólkartrot, og var mjólk bert seld teimum, ið áttu smábørn. Men tá nógv mjólk var til, fingu øll tað tey ynsktu. Um sumrarnar var støðan øðrvísi, tí tá var ovmikið av mjólk, og tá koyrdu vit hana í sentrifuguna fyri at taka róman úr henni. Tann avskúmaða mjólkin var ikki seld sum nú, men stoytt í rennuna. Tí sjógvurin uttanfyri meiaríið ofta hvítur av hesi avskúmaðu mjólkini. Tíbetur hendir slíkt ikki í dag.

### Rottan í mjólkini

Eg minnist sera væl frá hesi meiarítíðini, at um

Framhald á síðu 15




## NÚ ÆTLA VIT AT LÆTTA UM HJÁ POSTBOÐNUM!

Nógvir brævkassar hanga óhøgliga fyri hjá postboðunum. Tískil koma vit nú við eini leiðbeining um, hvussu brævkassar skulu setast upp. Leiðbeiningin verður borin út til hvørt húski hesa vikuna.
Vit heita á tygum um at fylgja hesi leiðbeining.



www.postur.fo

# Føroyskir hermenn í Edens hava!

## Føroyingar eru saman við donskum hermonnum farnir at hjálpa irakum at fáa fólkaræði

Tá ið Føroyar nú eru ein partur av danska kongaríkinum, eru vit eisini fyri ein stóran part tengd at tí, sum danska stjórnin ger í uttanríkis- og hernaðarmálum. Um hetta er rætt ella skeivt skal støða ikki takast til her.

Ein partur av danska politikkinum var at bakka upp um amerikanska forsetan Bush í Irak krígnum, hóast hetta kríggj seinni vísti seg at vera byrjað á einum sera ivasomum grundarlagi. Nú tá ið tað sæst, hvussu skilið hevur verið, síðani Saddam Hussein fall, kann ein ivast í, um hetta var stríðið vert. Men hinvegin verður hildið, at nú er ikki at gevast á hondum í stríðnum fyri at útvega irakum fólkaræði.

Danmark hevur sanniliga eisini givið sítt íkast til hesa ætlan við at senda hermenn til Irak, og tað eru fast einir 500 mans har niðri. Men tað er nógv útskifting, so tilsamans hava fleiri túsund mans og nakrar kvinnur verið har, millum hesi eisini fleiri føroyingar.

Danir hava hildið til í sunnara partinum av Irak – í Basra økinum. Her er upp á seg friðarligt. Av krígsávum er "bert" ein danskur hermaður deyður, hóast hetta er ein ov nógv.

Um miðjan februar var eitt nýtt lið við umleið 100 hermonnum sent avstað, og í hesum sambandi var um miðjan januar skipað fyri eini samkomu fyri avvarðandi, har tey kundu fáa eina kunning um endamálið við luttøkuni í krígnum í Irak eins og greitt varð frá umstøðunum hjá teimum sum fara.

Millum teirra, sum skuldu avstað, vóru eisini føroyingar, sum tískil eru partur í hesum virkseminum at tryggja einum kúgaðum fólki frælsi.



*Kári saman við systir síni Lindu og manni hennara Palla.*



*Her ein ein komandi danskur hermaður í Irak saman við mammu og systir.*



*Kári uttast tv. saman við tveimum feløgum, sum eisini fara til Irak.*

### Stutt um Irak

Um Irak kann í stuttum sigast, at í landinum búgva 23 mió fólk. Av teimum eru 97% muslimar, og av hesum eru tey 63% shiamuslimar, meðan 34% eru sunnimuslimar. Hetta er eitt heilt annað lutfall enn tað, sum annars er vanligt í muslimska heiminum, har 90% eru sunnimuslimar. Í Irak er eisini ein kristin minniluti, og hann hevur sum so ikki verið fyri vanbýti, sum tað annars er vanligt í nøgvum muslimskur londum. Alt ringt um Saddam Hussein, men í trúarspurningum var hann frísinnaður, og hevði enntá kristnan ráðharra, nevniliga tann kenda Tarik Asis.

Sunnimuslimar eru dominerandi norðanfyri í Irak og kring Baghdad. Saddam Hussein var sunnimuslimur, og nú eru tað hesir, sum ganga á odda í verandi uppreistrinum. Hóast teir vóru í minniluta, høvdu teir jú ræðið gjøgnum Saddam Hussein, meðan nú er tað øvugt, nú tað er fólkatalið og atkvøðurnar sum telja.

Shiamuslimar halda mest til sunnanfyri í Irak og serliga í Basra økinum, og so eisini í Iran, har tey flestu eru shiamuslimar.

Norðarlaga í landinum eru kurdarnir, men hesir eru minni religiøsir enn irakar sum heild. Teir hava eisini tikið sær ella fingið ein stóran part av sjálvræði.

### Í Edens hava

Sum sagt halda danir til í Basra økinum, sum nærum kann kallast fyri bíbilskt. Her liggur tað gamla Mesopotamia, landið millum áirnar, Eufrat og Tigris, har vøggan hjá sivilisatiónini stóð. Her eru støð, sum eru kend frá bíbliusøguni, so sum Bábylon, og Ur, hagani Ábraham kom á sinni.

Sjálvur Edens urtagarður sigst at hava verið her, og eisini verður víst á lívsins træ, sum víst sær sera gamalt út, so hvør veit…

Basra er bæði ein landspartur og ein býur. Býurin Basra hevur um eina mio. íbúgvar. Hann liggur 55 km frá persiska flógvanum og 545 km frá Baghdad. Støddin á landspartinum er 17.000 ferkilometrar ella góðar 10 ferðir Føroyar. Grannalondini hjá landspartinum Basra eru Iran og Kuwait. Tískil hevur hetta økið merkt nógv til tey kríggini, sum hava verið, fyrst við Iran og síðani við Kuwait, og sum Saddam Hussein hevði ábyrgdina av.

Basra er eitt fruktagott landbúnaðarøki, men fyrst og fremst eitt oljuøki. Oljuvinnan og avskiping av olju hevur størsta týdningin fyri landspartin.

### Kunningin

Á umrødda fundinum, sum var hildin á kasernuni í Holstebro í Norðurjútlandi, vóru fleiri hundrað luttakarar úr øllum Danmark. Hesir vóru spentir at frætta um tær uppgávur, sum danir høvdu á hesum fjara staði. Og ikki minst var tað trygdin, sum lá frammarlaga. Tað er nú ikki bert sum at siga tað, at senda son ella mann til eitt land, har tað dagliga frættist um vitleysar sjálvmorðsbumbur.

Endamálið við donsku luttøkuni er ein "visjón" – fyri at nýta eitt gott nýføroyskt orð, um at tað skal bera til í fyrsta umfari at útvega irakum fólkaræði. Síðan skal ábyrgdin fyri landinum flytast til irakiskar myndugleikar. Og tá alt hetta er komið uppá pláss, fer at bera til at taka hermenninar úr landinum aftur. Hvussu skjótt hetta kann lata seg gera veit eingin, men vónin er altíð, at tað skal henda innan eitt ár. Á fundinum varð eisini vón um, at talið av hermonnum kann minkast út í móti sumri.

Her hava danir so sínar serligu uppgávur. Ein er útbúgving og vegleiðing av irakum í hesum økinum. Ein onnur er at býta út neyðhjálp í tann mun, tað er brúk fyri tí.

Tað ræður eisini um at vera á varðhaldi. Tað er neyðugt at verða kunnaður um støðuna í økinum, so neyðug tiltøk kunnu takast, um nakað stingur seg upp. Ein stór uppgáva er eisini vaktarhald, tá talan er um flutning av vørum av ymiskum slagi í økinum.

Hetta krevur eisini eftirlit á ymiskum "check points", t.v.s. støðir, har øll mugu kannast sum fara framvið. Eftirlit má eisini havast við, at óviðkomandi ikki sleppa inn á avsperrað øki.

Eisini skal leitast eftir ólógligum vápnum, eins og eftir lógbrótarum av ymiskum slagi, sum eisini skulu standa til svars fyri sínar gerðir.

Fyri nøkrum vikum síðani frættist, at danskir hermenn høvdu verið við í einum átaki at handtaka 14 irakisk løgreglufólk, sum vóru hildin at hava samband við korruption og eina røð av óuppkláraðum drápum í Basra. Hildið var at tørvur var á at rudda upp, og hetta verður eisini gjørt!

Tann týdningarmesta uppgávan er annars at geva fólkinum á staðnum

eina útbúgving, so tey veruliga kunnu taka yvir, tá tíðin er búgvin til tess.

### Hóttanir

Her eru nógvar avbjóðingar. Tað gongur sjón fyri søgn, at tað er illvilji ímóti gongdina mótvegis fólkaræði. Men tað er samstundis greitt, at tað eru smáir víðgongdir minnilutar innan báðar muslimsku greinirnar, sum royna at leggja fótonglar fyri. Síðani er tað Iran, sum er blivið meira ágangandi við nýggja fundamentalistiska forsetanum. Teir brýggja seg ikki um amerikanska ávirkan í einum grannalandi. Afturat hesum koma so teir fremmandu hermenninir, sum hava fingið eitt "kall" at fara til Irak at berjast ímóti amerikanarum. Hesir eru kanska teir ringastu.

Eisini er kríggj millum ymiskar ættarbólkar, sum kunnu vera ein hóttan móti friðinum.

### Avbjóðing hjá norðurlendingum

Tað er ikki bert sum at siga tað hjá einum ungum dana ella føroyingi at fara til Irak. Bert hitin á sumri skuldi verið nóg mikið hjá føroyingi at setst aftur. Tað verða sett rættiliga stór krøv til teirra, sum bjóða seg fram at fara í útlendska tænastu. Umframt Irak eru eisini onnur øki, har danir eru, sum t.d. Afganistan, Sudan og Kosovo.

Hermenninir verða valdir eftir, um teir eru dugnaligir hermenn, um teir eru kropsliga væl fyri, um teir duga væl at vera saman við fólki, um búnaskap og annars áhuga fyri sakini.

Her krevst eisini fyrireiking, sum krevur dugnaskap og nærlagni. Neyðugt er at hava skil á vápnum, at duga at koyra við teimum akførum, sum verða brúkt, eisini tanksum, duga at geva fyrstuhjálp, hava signaltænastu, nevniliga at kunna boða frá og at kunna staðfesta, hvar ein er staddur, so sleppast kann undan at villast. Eldsløkking er eisini ein kunnleiki sum krevst. Men fyrst og fremst snýr tað seg um at samstarva.

Tað krevst eisini nakað av málkunnleika og kunnleika til viðurskiftini í økinum. Tað slepst nokkso langt við enskum. Men tað er eisini neyðugt at kenna irakisku mentanina, átrúðna, mentan, søgu, og at hava virðing fyri henni, so sleppast kann undan óneyðum misskiljingum. Hermenninir skulu eisini kunna geva boð á irakskum. Men annars er ein góð tolkatænasta, sum eisini er neyðug. Teir flestu av teimum eru lokalir, og teir eru sera útsettir í sínum samfelag, tí teir verða nevniliga av summum hildnir at vera eitt slag av svíkjarum og fáa javnan deyðshóttanir. Ein tulkur er eisini myrdur. Tað verður stúrt fyri, hvat ið fer at henda teimum, tá fremmandu hermenninir fara heim aftur.

Tað vísir seg eisini, at nógvir av teimum sum bjóða seg fram at fara til Irak, falla frá so hvørt tað gongur upp fyri teimum, at hetta er ikki nakar stuttleikatúrur. Hetta hevur ikki minst verið galdandi í samband við Muhamed øsingina, sum hevur verið. Men teir, sum eru eftir, kunnu so roknast fyri at vera "rættir" menn.

Donsku hermenninir halda til á Camp Danevang. Her eru tilsamans 5.000 hermenn, frá nógvum tjóðum. Umstøðurnar eru góðar bæði so og so.

Hermenninir hava sínar avmarkingar. Teir skulu halda seg frá konufólki og rúsdrekka. Tað eru tó nógvir aðrir møguleikar at nýta frítíðina. Her eru venjingarhøli, sjónvarp við 11 kanalum, internetkafé, møguleikar fyri bóltspæli og "kuffen". Tað er KFUM, sum hevur virksemi her. Eisini er danskur prestur á staðnum.

Maturin er eins góður og heima. Kantinufólkini eru indarar, sum hava loyvi at vera her í fleiri ár.

Tað tekur einar 5-20 dagar at fáa post og pakkar, men pakkarnir mugu ikki viga meira enn 2 kg.

Eitt slíkt hernaðarakfar Piranha skal Kári koyra í Irak.






Umráðið: Mesopotamia
- "Landið ímillum áirnar" (Eufrat og Tigris): Vøggan hjá sivilisatiónini.
- Babylon.
- Ur (Føðistaður Ábrahams).






*Hernaðarstøðin hjá "okkara" monnum.*

Teir, sum nú fóru til Irak, fóru avstað í fleiri umførum frá 10. til 16. februar. Treytirnar eru góðar. Í tí seks mánaðar skeiðinum, teir hava bundið seg til, kunnu teir sleppa heim í feriu. Uppstanda trupulleikar, er eitt netverk heima, sum tekur hond um hesar.

Tað eru fleiri heimasíður, har tað ber til at fáa meira at vita um støðuna. Tær eru www.Iraq6.dk og www.forsvaret.dk/hok

Viðvíkjandi trygdini verður hildið, at støðan er hampuliga góð, hóast tað ikki er púra vandaleyst. Menn ræðast tó mest tær sokallaðu "vejsidebomber", sum kunnu spreingja sjálvt tað sterkasta akfar í luftina. Tað var ein slík bumba, sum beindi fyri ungum donskum hermanni og særdi fleiri aðrar seinasta heyst, tá teir í jeepi koyrdu á eina slíka bumbu. Stig eru tó tikin til at fyribyrgja endurtøkur við at styrkja um vaktarhaldið. Beint áðrenn úrslitini av irakiska parlamentsvalinum vóru almannakunngjørd, vóru ávaringar um nýggjar bumbur, men tíbetur vísti tað seg ikki vera nakað hald í tí.

Sjálvt nú hetta rokið hevur verið um Muhammedtekningarnar hevur verið friðarligt á hesum økinum, og støðan verður nú roknað fyri at vera "normal".

Vit kunnu bert ynskja hesum ungu monnum eydnu við tí, teir nú fara í holt við, og samstundis ynskja, at hetta kann gerast til gagns fyri irakska fólkið.



*Lívsins træ.*

# Havnar Arbeiðskvinnufelag 70 ár

Tann 16. februar vóru liðin 70 ár síðan Havnar Arbeiðskvinnufelag varð stovnaði 1926. Gongdin í Føroyum var annars tann, at fyrst vórðu arbeiðsmannafeløg stovnað, hóast kvinnur vissuliga vóru á arbeiðsmarknaðinum serliga við fiskaarbeiði. Men so fóru kvinnurnar at skipa seg í sínu egnu feløg, og helst hava tær fyrstu verið í Havn. Spurningurin kann so vera um tíðin ikki er farin frá at hava serlig feløg fyri kvinnur. Í Danmark hava arbeiðskvinnurnar júst lagt saman við menninar.

Føðingardagin varð skipað fyri móttøku í húsunum hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag, har nógv fólk komu á gátt, ikki minst kvinnur!

Vit vóru eisini til staðar og tóku nakrar myndir.



*Her síggja vit tríggjar av forkvinnunum í felagnum. Til vinstru sitandi forkvinna Vigdis Johannesen. Síðan er tað fyrrverandi forkvinnurnar Svanhild Danielsen og Harriet Nybo.*



*Limirnir í HAK eru sjálvsagt kvinnur, men mannfólk, sum gera "kvinnuarbeiði" eru eisini limir.*



*Kitty og Henny eru væl kendur hjá teimum sum hava sína gongd á Hotel Hafnia.*



*Gunnleivur Dalsgaard og Anna Johannesen frá Starvsmannafelagnum fáa eitt prát við "mótpartin" Bjørg Ludvig frá býráðnum í Havn.*



*Kanska nýggir limir í HAK á veg.*



*Lurtað verður eftir løgmanni*



*F.v. Sigurd Poulsen, Niels Nielsen, Páll Nielsen og Birgir Dalfoss.*



*F.v.: Ann Mari Haraldsen, Borgarhjørt Joensen og Evita Jane Bruce, nevndarlimur í HAF.*



*Eyðgerð Skýlindal hevur verið nevndarlimur í mong ár.*



*F.v. Jutta Mortensen, fyrrverandi formaður í HAK, og Esther Láadal.*

Framhald frá síðu 10

mjólk stóð eftir í teimum stóru íløtunum, so máttu vit aftur smakka á hana at vita, um hon var súrnað, áðrenn vit koyrdu hana aftur ígjøgnum maskinurnar. Rómi lá sjálvandi omaná mjólkini í hesum stóru íløtunum. Einaferð tá ið eg skuldi smakka á mjólkina í hesum íløtum, sá eg eina myrka striku í rómanum, og setti tað tí til síðis. Tá ið eg var liðugur at kanna hini íløtuni, fór eg aftur til hetta ílatið, sum eg eisini hevði smakkað á og svølgt róman, tí hann var ikki súrur. Stoytti so mjólkina úr hesum ílatinum í eitt annað ílat, men tá fór okkurt myrkt úr ílatinum. Eg stoytti so mjólkina spakuliga aftur í hitt ílatið, og nú sá eg eina stóra rottu, sum var druknað í mjólkini um náttina. Rottur vóru at síggja allastaðni í fjøruni um tað mundið.

Hóast eg hevði svølgt róman við øllum tí íkastið, sum ein kann hugsa sær, at rottan hevði blanda upp í róman, so fekk eg ikki spý. Eg bleiv heldur ikki sjúkur og fekk ongan skaða av hesum, hóast alt "burturkastið" frá sjúkrahúsinum kom oman í fjøruna har á leið. Lucky me.



*Á trappuni á gamla sjúkrahúsi í Klaksvík. F.h. Anna Joensen og Olga Nielsen (Kjølbro).*

### Skyldmenn hittust á víðum havi

Eg kom heim at ferðast á fyrsta sinnið við "Nakki" fyrr "Eystfellið", sum Johan Purkhús, skipari í Klaksvík átti. Hann var giftur Idu, dóttir Jens Clæmint Isaksen, reiðara og handilsmanni í Klaksvík. Eg fór sjálvandi fyrst til Gøtu at vitja ommu, sum tá var farin út á Teigar at búgva hjá Sannu fastir, sum í hesum millumbilinum var gift við Herluf á Teigum. Í Gøtu var komin ein nýggj kei, sum Jóan Pauli Gregersen eisini greiddi frá í umrøddu sending.

Um heimferðina við "Nakki" er at siga, at vit fóru úr Aberdeen tíðliga í august. Vit høvdu nóg mikið at gera umborð við at koyra eplir o.a. niður í lastina. Motorurin, sum hevði 4 cyl., hevði gingið við trimum cyl. á veg niður, og høvdu teir fingið hann umvældan í Aberdeen. Men tá ið vit komu norður fyri Buchannesi, gekk hann aftur á 3. cyl. líka norður í Pentlands Firth. Teir sigldu so langt út frá landi, tí veðrið var gott. So skrúvaðu teir toppstykkið av og fóru at umvæla cylindaran. Hetta tók fleiri tímar, og beint áðrenn vit róku á land, fingu teir motorin í gongd aftur, og vit hildu leiðina fram móti Føroyum. Umframt meg vóru eisini tveir aðrir ferðamenn, Andreas Nolsøe, sum var skipari á "Reyða Krossi" og ein Mr. Willie, Lecturer in Mathematics á einum studentaskúla fyri dreingir nakað sunnanfyri London, sum skuldi til Føroyar "to study the Gannets on Mykines". Hesin var um fimti ára aldur, roykti pípu og sá út sum ein rættur Englishman.

Teir høvdu eina stong surraða undir bumminum, og tá ið vit sóu nakrar springarar nær bátinum, var harpun sett á hesa stongina, og teir royndu at skutla springarar, men tíverri eydnaðist teimum ikki at fáa nakran.

"It is a small world" siga teir her. Tá ið vit vóru komnir um hálva leið, sigur tann sum hevði havt róðurtørn við skiparan, at hann hevði sæð ein snurruvodsbát liggja uppsteðgaðan, og hann helt, at hesin hevði "H" skrásetingarnummar á bógnum. Johan vendi so bátinum, og vit sigldu ein knappan tíma suðureftir og komu fram á henda snurruvodsbátin, sum var uppsteðgaður. Teir høvdu mist kølivatnið. Men tað sum gjørdi alt meira áhugavert var, at skiparin/reiðarin á hesum snurruvodsbátur úr Hull var eingin annar enn Halden Napoleon Isaksen, vanliga nevndur Napp, f. 28. juni 1912 d. 18. juli 2005, systkinabarn Idu, konu Johan. Pápin var úr Fugloy, beiggi Jens Clæmint og teir. Teir tosaðu so um, hvat gerast kundi fyri at fáa motorin í gongd aftur, og eg minnist, at ein loysn var at seta tanga upp á stýrhústakið, so at kølivatnið kundi renna niður í motorin, tí pumpan var í ólagi.

Hesin Napoleon Isaksen bleiv seinni skipari á teimum fyrstu flakatrolarunum, sum vórðu bygdir í Onglandi, "Fairtry" nevndir. Vit hildu so leiðina fram, og tá ið vit komu móti Borðini, ringdi Andr. Nolsøe yvir Tórshavn Radio til synirnar, at biðja teir koma út eftir okkum trimum, sum skuldu til Havnar. "Nakkur" skuldi til Klaksvíkar. Synirnir komu so út á Borðina móti okkum. Har var eitt sindur sjaskut, so vit sigldu norður um ein tanga eystanfyri Nólsoynna, har tað eydnaðist okkum at sleppa umborð á "Reyða Kross" sum so sigldi okkum inn í Vágsbotn, har vit fóru í land uttan nakað hóvasták.

Ferðamøguleikarnir eru tíbetur nógv broyttir síðani 1950.

# Tá "Gullborg" gekk burtur í 1971

Fríggjamorgunin 4. november 2005, doyði fyrrverandi skiparin Harold Napier, sum átti M.V. "Morning Star", av bilvanlukku nærhendis heimabygdini. Hann var á veg við fiskasøluvogni sínum á rundferð har á leið at selja fisk, sum hann hevur gjørt, síðani hann seldi bát sín fyri fleiri árum síðani.

Hendan vanlukkan kom einum vælkendum føroyskum skipara illa við, tá ið eg boðaði honum frá hesum sorgarboðum sambært tíðindum í skotska blaðnum "Press and Journal". Tað var hesin skiparin, sum bjargaði Niels Jacob T. Nielsen av Strondum og manning hansara á trolaranum "Gullborg" uml. 60 fj. sunnanfyri Hetland, eina viku fyri jól í 1971. Tá høvdu teir verið í einum gummi bjargingarflaka í 27 tímar, og vóru teir koppaðir 3 ferðir. Fyrstu ferð fóru teir úr flakanum fyri at fáa hann aftur á "rættkjøl". Men hetta orkaðu teir ikki at gera báðar teir næstu ferðirnar hann koppaði, men fingu kasta seg við brotunum, so hann fór runt aftur. Samrøður vóru í fjølmiðlunum við Niels Jacob um hendingina. Í 2003 komu hann og konan niður til Skotlands, og hevði eg fyrireikað møti við Harald Napier og konuna við ein døgurða á einum hotelli norðanfyri Peterhead, har teir báðir fingu høvi at tosa saman um hesa hending.

*Gullborg.*







*Niels Jacob saman við skiparanum á "Morning Star" Harald Napier, tá teir hittust aftur.*

Tað var yngsti maður umborð á "Morning Star", 18 ára gamli Samuel Simpson, sum hevði róðurtørn, og sum sá gummiflakan. Hann rópti á skiparan, sum sjálvandi vendi og fór at taka teir upp. Teir á flakanum høvdu sæð skip og sent neyðrakettir o.a., men eingin hevði sæð teir, fyrrenn hesin ungi maðurin á "Morning Star" sá teir, og glaðir vóru okkara menn at síggja bjargingarmenn sínar. So merkiligt kann tað vera. Samuel gekk sjálvur burtur við skipi fyri einum 5 árum síðani.

Eg fór norður til Peterhead tað kvøldi, teir komu inn hagar. Hevði fyrr havt samband við Niels Jacob frá Lerwick. Hann hevði avtalað við meg, áðrenn teir fóru út at fiska tað vikuskiftið, at hann skuldi ringja til mín mánamorgunin kl 11, tí hann skuldi koma til Aberdeen eftir eykalutum, áðrenn teir fóru heim at halda jól.

Og sjálvandi var eg bilsin at hoyra Wick Radio kl 12.15 siga, at hann hevði eina samrøðu til mín frá "Morning Star". So hoyri eg røddina á Niels Jacob aftanfyri hann og spurdi, um hann tosaði gjøgnum føroyska skipið "Morning Star", tí sendarin hjá honum var í ólagi. "Nei", svarar Niels Jacob, "eg eri umborð á skotska trolbátinum "Morning Star". "Gullborg" sakk eftir 90 sekund-

Framhald á næstu síðu



*Manningin á "Gullborg" seinasta túrin. F.v. Niels Jacob Nielsen, Jógvan Rasmussen, Jákup Danielsen, Petur í Selvindi, Hans P Hansen og uttast Sofus Poulsen, umboðsmaður í Aberdeen.*




*Sjómansheim eru mangan hent. Her er sjómansheimið í Peterhead.*

um fyri 27 tímum síðani. Øll manningin hevði verið á einum gummibjargingarflaka alla hesa tíðina, og eru nú á veg inn til Peterhead."

Veðrið var framvegis ringt, 18 metur/sekund, og óvist var nær teir komu til Peterhead. Hann bað meg boða pápa sínum frá hesum. Hetta varð sjálvandi gjørt beinanvegin, og eg visti at "Polarfarið" lá í Lerwick, tí eg hevði tosa við Hay and Company fyrr um morgunin. Ringdi so aftur til Lerwick, og bað teir gera so væl at fáa skiparan á "Polarfarinum" Ernst Kass til telefonina. Tað var skjótt, at Ernst ringdi aftur, og eg greiddi honum frá hendingini og spurdi, um hann vildi bíða eftir manningini á "Gullborg", sum skuldi koma til Hetlands við flogfari skjótast gjørligt. Jú, tað var gaman í, og hann skuldi so landa tey tonsini av hvítingsbróður, hann hevði inni til fiskamjølsverksmiðjuna á Bressay.

"Morning Star" kom ikki til Peterhead fyrrenn uml. kl. 02.00, og har var fitt av fólki komið oman á keiuna, eisini ein radiomaður frá BBC. Lækni var har, sum skuldi kanna menninar, tí hann meinti ikki, at teir fóru at kunna fara heim beinanvegin, tá teir høvdu verið so leingi í hesum kalda gummiflakanum – vátir og kaldir og uttan mat og drekka. Men tá ið "Morning Star" kemur til bryggju, síggja vit, at gummiflakin liggur á dekkinum. Bert Niels Jacob hevði bandagu um aðra hondina, hinir tyktust at vera óskaddir. Læknin fór so umborð, og allir fingu grønt ljós at sleppa heim. Niels Jacob heldur, at tað var nógv føroysku undirklæðunum fyri at takka, at teir vóru so væl fyri.

Eg fekk teir so niðan á Sjómannsheimið, har teir kundu fáa brúsubað og turr klæðir at fara í. Síðani fingu teir nátturða, tá var kl. 03.00 og ein klædnahandil lat eisini upp, so teir allir kundu keypa sær nýgg klæðir. Seinni lat eisini ein skógvahandil upp, so teir eisini kundu keypa sær nýggjar skógvar. Eg minnist, at eg segði við mannin, sum áttið handilin, at tað var "pent" gjørt av honum at koma oman at lata handilin upp kl 04.00. Hann svaraði mær, at hann hevði sjálvur verið sjómaður, og at tað var honum ein gleði at kunna verða okkara sjómonnum til hjálpar. Tá ið teir høvdu fingið alt, sum neyðugt var, fóru vit allir í einum stórum Rolls Royce taxabili til Aberdeen. Vit vitjaðu Alex Whyte, agentin, og inspektørurin hjá Board of Trade var eisini har og vildi nýta høvi at spyrja skiparan um hendingina. Men eg segði, at teir skuldu út í lufthavnina beinanvegin fyri at sleppa við flogfarinum til Hetlands, tí "Polarfarið" lá í Lerwick og bíðaði eftir teimum at føra teir heim. Hann fekk bert spurt Niels Jacob, hvussu teir sluppu í gummibjargingarflakan av bátadekkinum. Jú "Gullborg" sakk innan 90 sekundir, so teir sluppu beint av bátadekkinum í bjargingarflakan, sum fleyt har...

Heimferðin gekk sum ætlað, og teir fingu jólini heima saman við sínum kæru, men allar tær stóru jólagávurnar fóru tíverri til botns við "Gullborg".

Sum teir siga her "a tragic incident at sea with a happy ending".




*Árið eftir fekk manningin á "Morning Star" hvør sína føroyska troyggju frá spinnarínum Snælduni á Strondum. Her sæst hon saman við Sofus Poulsen, sum tekur í hondina á skiparanum. Nr. 2 f.v. síggja vit Samuel Simpson, sum varnaðist gummibátin av Gullborg, og sum tískil var beinleiðis orsøkin til, at teir vórðu bjargaðir. Lagnan vildi tað so, at hann fekk sjálvur eina váta grøv.*
*Manningin fekk eisini heiðursmerki frá landsstýrinum "Bundin er bátleysur maður".*

# Lívið hevur ikki bert verið fiskur

Gjørdi Sofus nakað annað enn at fáast við skip, fisk, handil o.a. øll hesi mongu árini á Umboðsstovuni í Bretlandi?

Jú, hann var m.a. við í einum mannskóri tey fyrstu árini, og er hann vist einasti føroyingur, sum hevur sungið í Royal Festival Hall í London.

Einsamallur var hann tó ikki á pallinum í september 1951. Hetta var Festival of Britain-árið, tá ið Bretland aftur vaknaði upp úr krígsøskuni, tí nógv av London lá framvegis í sorið av týsku bumbuálopunum undir seinna heimsbardaga. Bretska stjórnin tók tí støðu til at seta upp hesa risa messuna, sum skuldi vísa, at Bretland ikki lá deytt, men var við at menna seg aftur eftir heimsbardagan. Árið 1951 var eisini eitt sermerkt ár, tí tað var júst í 1851, at fyrsti Festival of Britain var. Tá var Queen Victoria drotning í Onglandi og maður hennara Prince Albert, var ein av stigtakarunum til hesa fyrstu risamessuna. Umframt allar møguligar handilsmessur og serbygningar, vóru eisini stór mentunarlig tiltøk, og tað var í samband við eitt slíkt tiltak, at Sofus kom upp á pallin – tó ikki einsamallur – í Royal Festival Hall, sum er einasti nevniverdigi bygningur, sum enn stendur eftir av Festival of Britain bygningunum. Tað var British Festival of Male Voice Praise við 500 monnum frá flestu pørtum av Bretlandi, sum hetta kvøldið høvdu eina konsert fyri fullum húsi. Konsertin vardi í uml. 2 tímar. Sofus eigur fotomyndir av 500 mans stóra mannskórinum og av áhoyrarunum. Myndirnar eru so klárar, at ein kennir fólk á báðum. Man nakar føroyingur hava sungið har síðani?

BÁTAR · LEYSAMOTORAR · VIÐFESTISVOGNAR · TELTVOGNAR




Nú er møguleiki at gera kvettið



Vit selja nakrar av bátum okkara við stórum avsláttri, umframt at vit hava sera góð tilboð uppá Mercury leysamotorar.

STUBBIN

Kvívík · tel 421 805 · www.stubbin.fo

## Ársroknskapur 2005

### Rakstrarroknskapur

| 1000 kr. | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur v.m. | 17.031 | 17.708 |
| Rentuútreiðslur v.m. | 4.511 | 4.467 |
| **Netto rentuinntøkur** | **12.521** | **13.241** |
| Vinningur av partabrøvum | 81 | 479 |
| Kostnaður og provisjónsinntøkur | 2.293 | 2.139 |
| **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **14.895** | **15.859** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum og gjaldoyra | 664 | -2.754 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 200 | 138 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **15.758** | **13.243** |
| Útreiðslur til starvsfólk og umsiting | 14.300 | 13.301 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 323 | 196 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 0 | 0 |
| Tap og burturleggingar | 428 | 1.350 |
| Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 75 | -956 |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **782** | **-2.560** |
| Aðrar óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Aðrar óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Úrslit av vanligum rakstri undan skatti** | **782** | **-2.560** |
| Skattur | -224 | 445 |
| **Ársúrslit** | **558** | **-2.115** |
| **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| Ársúrslit | 558 | -2.115 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 36.984 | 37.900 |
| Flutt frá øðrum grunnum | 1.200 | 173 |
| **Til nýtslu** | **38.743** | **35.958** |

### Fíggjarstøða 31. desember

| 1000 kr. | 2005 | 2004 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og ogn uttan uppsøgn í tjóðbankum | 9.086 | 11.898 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 14.396 | 11.848 |
| Útlán | 313.255 | 270.178 |
| Lánsbrøv | 30.443 | 57.536 |
| Partabrøv | 5.275 | 4.166 |
| Kapitalpartar í associeraðum fyritøkum | 1.708 | 892 |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 2.960 | 2.502 |
| Ítøkiligar ognir | 4.789 | 3.256 |
| Aðrar ognir | 360 | 583 |
| Tíðaravmarkingar | 1.086 | 879 |
| **Ognir tilsamans** | **383.357** | **363.738** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar og tjóðbankar | 5.283 | 1.045 |
| Innlán | 334.151 | 318.858 |
| Onnur skuld | 455 | 1.038 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 0 |
| Avsetingar til skyldur | 830 | 800 |
| Eftirsett kapitalinnskot | 4.000 | 4.000 |
| **Eginogn** | | |
| Ábyrgdarapeningur | 1.095 | 1.013 |
| Grunnar | 0 | 1.200 |
| Flutt frá undanfarnum árum | 36.984 | 37.899 |
| Flutt frá ársúrsliti | 558 | -2.115 |
| **Eginogn tilsamans** | **38.638** | **37.997** |
| **Skuld tilsamans** | **383.357** | **363.738** |
| Tøl, sum ikki eru við í fíggjarstøðu | | |
| Ábyrgdir o.a. | 2.715 | 3.780 |

SUÐUROYAR SPARIKASSI

REPROZ

# Schwartz 80 ár

Komandi mánadag 27. februar verður Schwarts Jacobsen í Norðragøtu 80 ár, og vilja vit fegin bera honum eina heilsu.



*Schwartz og konan Noomi sum ung.*

## Heilsan frá Brendu

Brenda er dóttir Otto, beiggja Schwarts, sum búði í USA. Brenda sendir pápabeiggjanum hesa heilsan:

A Birthday Message for our Uncle Schwartz, Happy Happy 80th Birthday to one of the kindest, wisest and most jolly people we know. A true gentleman! We love you!

***Brenda, Dave, and the girls***

Schwartz er sonur Nicolinu og Amaliel, Maljar kallaður, Jacobsen. Nicolina var dóttir Fredrik á Fløtti í Norðragøtu, og Maljar var sonur Petur Jakku í Ytstahúsi á Skipanesi. Her skal ikki verða sagt meira um ættina hjá Schwartz. Hon verður nevniliga lýst í komandi bløðum, tá ið vit fara at hava frásøgn um systkini hjá abba Schwartz, sum komu víða um í heiminum.

Nicolina og Maljar fingu 12 børn, har Martin doyði sum smádrongur. Grannalagið var sera barnríkt. Næst hjá Maljari búðu Sunneva og Eliesar, sum fingu 13 børn og næst teimum búðu Martina og Hellu Meinhard, sum eisini áttu 13 børn. So sjálvt um ikki øll vóru børn í senn, so var lívligt í grannalagnum.

Við 11 systkjum, sum øll giftust og fingu børn, er talan um eina sera stóra ætt, sum er at finna runt um í heiminum. Elsti beiggin Otto giftist enskari konu, og tey búsettust í Amerika á Boston leiðini. Hetta við at røkja ættina er eisini nakað sum Schwartz ger, tí hann er sera ættarkærur. Tað var fyrst og fremst hann, sum hevði sambandið við Otto, og hetta var í teimum tíðum, tá ið samskiftismøguleikarnir ikki vóru sum í dag. Hann ferðaðist eisini til Amerika og onkuntíð hevði hann eisini pápan við. Tískil er framvegis rættiliga tætt samband við ta greinina av ættini. Tað kann verða nevnt, at Otto ynskti at verða jarðaður í heimbygdini Gøtu, og tað bleiv hann eisini. Hann varð borin til sín seinasta hvíldarstað av sínum egnu systkjum.

Eg var sjálvur og vitjaði Otto fleiri ferðir, tá leiðin gekk tann vegin, og var tað sera hugnaligt. Seinni havi eg eisini saman við allari familjuni vitjað dóttrina Brendu, sum var sera blíð. Eitt árið var Brenda og ferðaðist í Føroyum við sínari familju. Í USA eigur hon onga ætt, men tá hon kemur til Føroyar, hittir hon kanska einar 100 næstringar! Havi júst verið í samband við Brendu, og hon letur heilsa Schwartz og hansara so hjartaliga.

Ættin hjá okkum báðum hevur verið eitt sindur "forflogin." Schwartz hevði eisini ein pápabeiggja í Írlandi, Jóan Fredrik. Sonur hansara Fredrik Amaliel hevði m.a. neyvt samband við Schwartz inntil hann doyði undan jólum.

Onkur hevur undrast á, at foreldur tá í tíðini kundu kallað eitt barn fyri Schwartz; men tað var ikki so løgið kortini, tí hann varð upkallaður eftir læknanum, sum tá var, og sum man hava verið ein góður lækni. Og tá børnini vóru so mong var kanska eisini brúk fyri at fara út um ættina eftir nøvnum.

### Handverkari

Schwartz gjørdist handverkari burturav. Eftir at hava gingið í skúla í Gøtu hjá tí legendariska "gamla lærara", Símun Paula í Konoy, fór hann til Klaksvíkar at læra á snikkaravirkinum á Varpinum, sum Kjølbro átti. Eina tíð undir krígnum arbeiddi hann í Havn hjá Herluf hjá Vágaheina, men hann fór so aftur til Klaksvíkar, har hann gjørdist leiðari á Varpinum, og var hann har í mong ár.

Meðan Schwartz var í Klaksvík giftist hann við Noomi. Tey giftust 23. oktober 1954. Foreldrini hjá Noomi vóru Súsanna og Richard Joensen úr Gerðum. Hann hevði tó hug at koma aftur til Gøtu, eins og hann vildi skapa virksemi har. Hann fór tí undir at byggja sítt egna virki Alu-plast, sum framleiðir vindeygu og hurðar v.m. úr plasti, og hetta er framvegis eitt gott og stórt arbeiðspláss í Gøtu. Virksemið byrjaði her í 1973. Umrødda plastframleiðsla var nýhugsan tá í tíðini, og Schwartz var ein av teimum allar fyrstu í kongaríkinum, sum fóru í holt við slíka framleiðslu. Sum við øllum nýggjum var hetta eitt stórt knoss, eisini at fáa fólk at trúgva uppá hugskotið. Men tað gekk!

Fyri nøkrum árum síðani lat Schwartz hetta virksemi frá sær, men teir, sum tóku við, hava eisini dugað at vera áhaldandi og at menna virksemið.

### Eisini virkin á andaliga økinum

Scwarts hevur ikki bert hugsað um tað verðsliga. Hann hevur í mong ár – eins og pápin undan honum – verið ein dyggur stuðul í brøðrasamkomuni Filadelfia í Gøtu. Væl hevur ligið fyri hjá honum at hava orðið. Her hevur hann eisini lagt frá sær, men hann hevur eisini dugað at sett við á hesum økinum.

Noomi og Schwartz fingu tríggjar synir, og teir hava havt eitt sera breitt virkisøki. Richard, giftur við Onnu Kjærbo, er apotekari, og arbeiðir hjá landsapotekaranum.

Amaliel er giftur við Lennu Dalbø, hevur alla tíðina verið við í Aluplast, men hevur nú gjørt av at royna okkurt annað. Hann býr í Norðragøtu og er granni hjá foreldrunum.

Suni Schwartz, giftur við Anitu Solmunde, er nýsettur stjóri í Føroya Banka.

Myndirnar til hesa grein eru frá móttøkuni í bankanum í hesi sambandi.

Noomi og Schwartz eiga 9 barnabørn.

Schwartz var systkinabarn við pápa mín, og vit hava eisini notið gott av hansara ættartokka, sum eisini eru farin í næstu ættarliðini. Hann er fryntligur og fyrikomandi, og tað er altíð stuttligt at hitta hann. Heilsan má sigast at vera góð, og tað verða uttan iva nógv sum fara at heilsa honum føðingardagin.

***Óli í Tjørnustovu***



*Richard og Anna.*



*Alexander, Jenny, Lenny, Schwartz og Amaliel.*



*Súni, í miðjuni, saman við Jóhan Páll Joensen (t.v.) og Janus Petersen.*



*Hetta eru tey avarðandi hjá Suna: Jan, sonur, Anita, konan, Joan, dóttir, John, sonur og Durita, verdóttir.*

Teddy farin:

# Var ein góður felagsmaður

Tann 4. februar frættust deyðsboðini av Teddy Michelsen av Tvøroyri. Hann var farin – 78 ára gamal.

Teddy var ein merkisverdur persónur, sum tað var ein forrættur at kenna. Vit møttust í 70-unum, tá ið Teddy var nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag. Um somu tíð ferðaðist eg nógv til Tvøroyrar, og tá vitjaði eg javnan Teddy. Síðani tá hava vit havt samband okkara millum. Heima hjá Teddy var eg møttur við einum hjartalagi og einum blíðskapi, sum eg altíð fari at minnast. Tá kom eg eisini at kenna Odu og døtrarnar hjá teimum. Tey vóru eitt sera hugnaligt húski, har ein altíð kendi seg væl at koma.

Teddy var sonur Kristinu, f. Olsen, ættað av Sandi, og Petur Michelsen. Tey vóru 9 systkin og afturat teimum ein fosturbeiggi. Av teimum liva nú fýra eftir. Teddy er uppvaksin í Valinum í miðbýnum á Tvøroyri, og er Valurin fremsta ímyndin av einum føroyskum verkamannabýlingi í Føroyum. Her áttu fólk ikki jørð, og høvdu bert sínar egnu hendur at líta á. Tað man vera her, at Teddy hevur fingið sín samfelags- og fakfelagsáhuga. Í Valinum vistu tey, at her fekk verkafólkið einki forerandi, soleiðis sum tað so væl er greitt frá í bókini Fylking hjá Jóannes Dalsgaard! Mamma Teddy vaskaði fisk, og pápin var skiftivís fiskimaður og arbeiðsmaður á landi.

Sum vanligt tá í tíðini, fór Teddy blaðungur til skips. Hann fekk júst um endan av siglingini undir krígnum. Eftir kríggið fór hann við "Westward Ho", sum tá neyvan hevur verið betri útgjørd enn hon er í dag, nú hon er eitt fornminni. Farið var á Suðurlandið, sum var tann vanliga og mest vandamikla leiðin hjá føroyingum í mong ár.

Í 1950 fór Teddy á skipaskúla, og sigldi hann í 21 ár. Seinni sigldi hann í styttri tíðarskeið, og hann sigldi eisini við framkomnum skipum sum t.d. "Sólborg".

Í 1966 fór Teddy at arbeiða hjá landsverkfrøðinginum, og var her til 1994-95 ella úti við 30 ár. Hann arbeiddi fyrst við at gera bergholini til Hvalbiar og Sandvíkar seinast í 60-unum. Annars var kavarudding eitt av hansara jobbum, og hevði hann ábyrgdina av teininum Tvøroyri-Hvalba-Sandvík. So tá kavi varð lagstur, var Teddy fyrsti maður av songini, og hetta hevur mangan verið buldrasligt. Tað kom fyri, at tað tók ein heilan dag at grava seg ígjøgnum nevndu leið, har vegurin als ikki sást fyri kava, so tað var ikki vandaleyst heldur.

### Felagsmaðurin

Teddy var ein álitismaður, og tí vóru skjótt boð eftir honum. Fyrst og fremst var tað fakfelagsarbeiði, sum lá honum á hjarta.

Í hesum arbeiði kom hann eisini at virka fyri fiskimenn. Hann var í trý ár næstformaður í Suðuroyar Fiskimannafelag, við tí nú 90 ára gamla Karl Jespersen sum formanni. Tá hevur Teddy verið heilt ungur, í 20-unum. Søgan aftanfyri Suðuroya Fiskimannafelag var, at í 1934 gjørdist ein slíkur tvídráttur millum fiskimenn norðanfjørðs og sunnanfjørðs um sáttmálan við reiðarafelagið, at Føroya Fiskimannafelag fór í tvíningar. Og mangir vóru dystirnir millum feløgini hesi ár.

Ofta verður sagt, at føroyingar vóru skjótir til sundurlyndi og seinir at sameinast. Men hetta er so eitt dømi um tað mótsatta. Í 1957 samdust feløgini um at leggja saman aftur, og var hetta ein søgulig hending innan fakfeløg. Teddy var við í hesum avriki, og var saman við hinum nevndarlimunum í Suðuroya Fiskimannafelag eisini nevndarlimur í FF í eini skiftitíð.

Teddy var eisini eitt skifti nevndarlimur í Froðbiar Sóknar Útróðrarfelag.

Men annars var tað innan arbeiðarrørsluna, at Teddy kom at hava størsta partin av sínum fakliga virki. Hetta var lutvíst innan arbeiðsmannafelagið Fylking á Tvøroyri, og lutvíst innan Føroya Arbeiðarafelag. Teddy var formaður í Fylking í 1973-74, næstformaður 1971-73, skrivari 1982-83, kassameistari 1977-78 og eykamaður 1981-82 og 1984-85. Teddy gjørdi m.a. eitt stórt arbeiði fyri at fáa sett á stovn Tvøroyrar Flakavirki, sum hevur havt alstóran týdning fyri bygdina.

Teddy kom í nevndina í Føroya Arbeiðarafelag í 1973. Her sat hann saman við formonnunum Johannes Olsen og Ingeborg Winther.

Teddy hevði eisini arbeiði sum prísansari í nógv ár. Hann fekk hetta starv seinast í 60-unum. Tað var týdningarmikið at hava eftirlit við prísunum í teimum ymsu handlunum í økinum, sum skuldi tryggja brúkarunum lægst møguligar prísir. Vitjað var í 5 handlum um mánaðin, har útsøluprísir og fakturaprísir vórðu kannaðir. Tilfarið varð síðani sent Prísráðið Føroya í Havn. Prísansanin er tíverri seinni avtikin.

### Tað týdningarmesta var Salem og familjan

Men tað sum hevði størstan týdning fyri Teddy var andaliga virksemið, sum hann í 50 ár var við í. Hann var sera virkin í brøðrasamkomuni í Salem á Tvøroyri. Ikki minst arbeiðið í sunnudagsskúlanum lá honum á hjarta, og tað verður tikið til, hvussu væl hann dugdi við børnunum. Nei, hann setti ikki sítt ljós undir skeppuna.

Oda og Teddy giftust í 1956 og fingu 4 døtur, Evi, Kristbjørg, Nomi og Diana. Tær tríggjar elstu eru giftar og búsettar í Danmark. Tí ferðaðust Oda og Teddy ofta niður at vitja tær. Yngsta dótturin Diana er gift og býr í Havn, og tí gekk leiðin eisini ofta til Havnar. Barnabørnini er 6 í tali.

Teddy var øðrvísi enn fólk flest. Hann hevði sagt, at dagurin, tá ið hann fór til gravar, skuldi ikki vera ein sorgardagur men ein gleðisdagur. Hetta var eisini fult út í samsvar við hansara lyndi. Roynt varð eisini at liva upp til hetta hansara ynski, hóast saknurin var stórur. Og dagurin hann fór til gravar, gjørdist ein av fagrastu døgum í árinum við stilli og sól.

Eg vil fegin takka Teddy og Odu fyri tað, sum vit høvdu saman. Teddy fer ikki at verða gloymdur av okkum, sum kendu hann.

*ó.*



*Teddy.*



*Nevndin í Føroya Arbeiðarafelag í 1975, tá felagið gjørdist 50 ár.*
***Fremst f.v.:** Hansina Midjord, Fuglafjørð, Arne á Rógvi, Vestmanna, Anna Berg, Skáli.*
***Aftast:** Andreas Højgaard, Vestmanna, Teddy Michelsen, Tvøroyri, Johannes Olsen, Sandavágur og Símun Pauli Poulsen, Fuglafjørður.*
*Johannes Olsen var formaður og Arne av Rógvi næstformaður. Í dag liva bert Símun Pauli og Anna eftir.*

## Rokveiða eftir upsi

Tað er tað spennandi við at fáast við fiskivinnu, at her gongur sjáldan sum væntað. Tað eru bert fá ár síðan, at upsastovnurin undir Føroyum varð spáddur sín undirgang, um stig ikki vórðu tikin at verja hann. Slík stig vórðu ikki tikin, og síðan tá hevur upsaveiðan verið størri nakrantíð, serliga tá hugsað verður talið av upsa, sum verður veitt.

Tað man hava komið onkrum fiskimanni til hugsa, um hetta kundi halda áfram, men upsaveiðan hevur ikki verið størri enn hon er nú. Partrolararnir fylla seg eftir fáum døgum, og nú er tað góður upsi sum verður fingin. Tað er bátar, sum longu hava fingið eins nógv higartil í ár sum teir fingu heili ár fyrr. Og sjálvt um 2005 var eitt sera gott ár til nøgd, so eru tað teir, sum hava fingið eins nógv higartil í ár sum allan fyrsta ársfjórðing í fjør.

## Nýggir møguleikar fyri at fáa livur

Tað er eingin ivi um, at kryvjimaskinan man hava verið hent hjá fiskimonnum í teirri rokveiðu eftir upsa, sum vit hava havt í fleiri ár. Men vansin við hesi maskinu er, at hon fer illa við innvølunum, sum tískil illa kann koma til sættis í hesum "livratíðum". Hetta hevur verið nýtt sum ein grundgeving móti kryvjimaskinum.

Men her eru framstig at hóma. Ein av partrolarunum hevur roynt eitt tól, sum kann skilja livur frá innvølinum annars, og sum harvið kann bjarga livrini.

Sum við øllum øðrum uppfinnilsum, so skal hetta eisini lagast til. Tað byrjaði ikki væl, men nú hevur manningin sjálv tikið stig til broytingar, og hetta tykist at rigga betri. Við áhaldandi ábótum eru vónir um, at livur kann takast uttan at hetta tarnar arbeiðsgongdini umborð, og vil hetta vera eitt frambrot á hesum økinum.

## Jákup á Dul í komandi blað

Seinastu vikuna hava fjølmiðlarnir verið á tremur við ætlanina hjá Jákup á Dul Jacobsen um hansara stóru milliardaverkætlan í Hoyvíkshaganum. Vit ætla ikki at endurtaka hesi tíðindi, men fara at hava ein lýsing av Jákup sjálvum og tí umhvørvi hann kemur úr.

Í komandi blað verður eisini fyrsti partur um Skipanes, og um nøkur av teimum sum fóru hagani út í stóru verð fyri 100 árum síðani.

# Lat okkum fáa vit og skil at ráða fyri stýrisskipanini

Kári á Rógvi ger viðmerkingar til kjakið um stýrisskipanarlógina. Kári skrivar PhD ritgerð við Háskóla Íslands, men fæst eisini við nevndararbeiði og seyð her heima í Føroyum.

FF-blaðið hevur skrivað sera nógv áhugavert og gløgt um stjórnarskipan okkara (stýrisskipanina, grundlóg, fyrisitingarlig rættindi, onnur mannarættindi og grundreglur).

Í blaði nr. 359 skrivar Óli Jacobsen um seinasta stríðið um stýrisskipanarlógina og arbeiðsloysisskipanina og barsilsskipanina.

Stutt sagt stendur stríðið um, hvørt "jurain" skal liva sítt egna lív, og juristar skulu sleppa at ráða, hvat stýrisskipan, lógir og løgfrøðilig hugtøk bera í sær, ella um fólkið ígjøgnum síni valdu umboð skal ráða yvir juraini.

Vit, sum í fleiri ár hava roynt at smíða ein avloysara fyri ta illa egnaðu stýrisskipanarlógina, hava ikki júst verið plágaði av áhuga frá vanliga manninum. Eg hugsi ikki, at fólk standa undir neystaveggjum, sita á kaffistovum ella í messuni og práta um álitini hjá stjórnarskipanarnevndini (fyrr grundlógarnevndini).

Men hetta málið sýnir júst, hvussu týðandi tað er, at "tann meinigi maðurin" gevur sær far um hesar spurningar. Føroyar hava vald á næstan øllum málsøkjum, og føroyingar kunnu ráða í Føroyum, um teir bara ómaka sær at gera tað. Í 1948 fingu vit eina fittliga stýrisskipanarlóg, ið tíverri varð ov illa umsitin, men sum gjørdist ein hent undanførsla, tá kreppan kom. Politikarar, ið høvdu ábyrgd í felag, lótu sum, at ongin hevði ábyrgd og bestiltu sær eina nýggja skipan.

Tann nýggja skipanin gjørdist ein "typubygningur," betur egnaður til heilt annað farvatn, gamlar danskar reglur umsettar uttan stórvegis fyrilit fyri siðvenju, tørvi ella royndum. Stýrisskipanarlógin varð trumlað ígjøgnum við fráviki frá tíðarfreistini beint uppundir eina biddaraferð til Danmarkar og ásetir millum annað:

**§ 41.** Eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur má verða álagdur, broyttur ella avtikin uttan við løgtingslóg.

...

**Stk. 3.** Áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á løgtingi, er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í stk. 1.



*Kári á Rógvi, næstformaður í Stjórnarskipanarnevndini, Mikael M. Karlsson, leiðari fyri samfelags- og lógardeildini á Fróðskaparsetrinum á Akureyri, og Halgir Winther Poulsen, advokatur, hugna sær í heiminum hjá Matthias Jochumsson.*

## Sítt egna lív

Nú er tað, at jurain fer at liva sítt egna lív. Spurdu vit tey, ið samtyktu stýrisskipanina, um § 41 varð ætlað at forða fyri samhaldsfastari arbeiðsloysistrygging, so varð svarið ivaleyst eitt rungandi nei!

Søguliga stavar ásetingin frá tíðini mitt í 1800-talinum, tá valdið varð býtt ímillum kong og ting. Danir vildu sum onnur lond tryggjað sær, at kongur ongan møguleika hevði at áleggja skatt uttan fólksins undirtøka varð staðfest á tingi.

Hvørki endamálið við stýrisskipanarlógini, søguligu fortreytirnar, siðvenja í Føroyum, siðvenjan í øðrum norðanlondum ella nakað annað skilagott argument talar fyri at halda at tann í skundi innflutta stýrisskipanarlógin skal verða nøkur forðing fyri ALS.

Men juristar okkara eru ikki útbúnir í samfelagsviðurskiftum, søgu, máli ella øðrum viðurskiftum, sum gera tey før fyri at loysa slík mál. Juristar á Københavns Universitet læra fyrst og fremst eina røð av bókum uttanat og læra at svara tað, sum professarin hevur skrivað í lærubókini hjá sær.

Tíbetur eru tað ikki so fá skilafólk ímillum juristarnar kortini, men tað er sjálvdan vegna útbúgvingina, heldur er tað av uppvenjingini aftaná lesnaðin. Tí eru vit nøkur, sum hava tikið okkum saman at útbúgva fólk í lógarkunnleika í Føroyum, men tað er ein onnur søga.

Tann grunni juristurin hyggur bert at orðunum "skattur" og "við løgtingslóg." Orðið skattur verður (fullkomiliga leyst av søgu og siðvenju) definerað sum "gjald, ið er størri enn tænastan, borgarin fær afturfyri." Tá summi gjalda inn í ALS uttan nakrantíð at gerast arbeiðsleys, onnur gjalda prosentir av síni høgu inntøku, men fáa kortini ikki meir enn eitt vist útaftur, og stýrið samstundis hevur spart upp umleið hálva milliard til verri tíðir – ja so er jú greitt, at talan er um skatt! Juristurin tekur sær rættin at definera hugtakið fyri tingfólkið, og so hava tingfólk í mong ár – uttan at hava ánilsi av tí – brotið sína egnu stýrisskipan.

Loysnin, halda summi av hesum fólkunum, er, at landið eigur ta hálvu milliardina, og at landið skal krevja gjaldið inn og síðani játta pengar út aftur.

## Hvør ger av?

FF-blaðið vísir á, hvat hendir í málum um brot á stýrisskipanina; himmalin dettur ikki niðuryvir tann seka, heldur krevst, at onkur myndugleiki tekur støðu og staðfestir, at brot er framt. Tað mangan umrødda yrkisráðið kom ikki í lag, tí vit í Føroyum ikki hava nakra sterka siðvenju fyri at krevja at myndugleikar standa til svars fyri gerðum sínum. Var hetta í onkrum amerikanskum stati, so vórðu hoyringar hildnar í senatinum, greinar skrivaðar í lógarritum, og málið helst roynt í rættinum. Var hetta í øðrum norðanlandi, var tað kanska meira í miðlunum og fyrispurningum á tingi, at málið kom fram, og vánalig grundgeving hevði skatt ministaran, kanska óbótaliga. Í Føroyum seyraði málið onkursvegna burtur, tí juristunum ikki dámdi, at bæði tingið og løgmaður kundu gera nakað við málið. Tann sama øvugta jurain gjørdi seg galdandi í "Jógvan S"-málinum og mongum øðrum málum við, tá tann mest upplagda ella neyðuga loysnin ikki stendur meislað í grót onkustaðni, ja, so má tann øvugta loysnin verða røtt. Tingmenn fáa enntá átalu fyri at siga tað, sum eg skrivi nú.

Sum ávíst í FF-blaðnum, so hevur formansskapurin á tingi valt at leggja dent á, at teir tríggir juristarnir í løgtinginum eru samdir. Málið vísir júst, hvussu vánaligt tað argumentið er. Vit sótu seks juristar í fleiri ár og kannaðu ALS spurningin, eisini skattaspurningin, væl og virðiliga. Meirilutin kom til, at ALS var loyvilig skipan, at talan var um kravda samhaldsfasta tryggingarskipan, at ikki var talan um skatt, soleiðis sum hugtakið eigur at skiljast, og at ongin meining var at siga, hvør "eigur" ALS; tað avgerðandi er, alt í ALS rættini er markað til arbeiðsloyssinendamál og kann ikki brúkast til annað. Minnilutin var ikki heilt samdur í, at stýrisskipanarlógin varð hildin, men helt at ALS hevði vunnið serliga støðu sum siðvenja. Løgtingsskrivstovan formáddi at skriva nakrar fáar reglur um, at hetta "stóð ongastaðni" – og so mátti tað øvugta vera galdandi, ALS hevði bjargað Føroyum undan vanlukku í krepputíðini, hevði fyrireikað okkum til næstu kreppu, hevði megnað tað heilt sjáldsama at skapa eina skipan, sum grannalond okkara halda vera betri enn teirra egnu.

Sjálvandi er semja á løgtingsskrivstovuni. Talan er um tríggjar starvsettar juristar, ið ikki eru óheftir av arbeiðsgevaranum ella av hvørjum øðrum. Mannagongdin var eisini, at tann eini skrivaði áðurnevndu reglur, uttan at nakar slapp at leggja sakina fram. Løgtingsmenn sleppa ikki at viðgera teir stjórnarligu spurningarnar. Tingið kann bara atkvøða fyri ella ímóti tilmælinum, uttan nakað orðaskifti og uttan at ALS ella vit, ið høvdu viðgjørt málið óheft av tinginum, fingu nakað høvi at greiða frá sjónarmiðum okkara. At gera sum ásett í Íslandi at lata ivamálið um ALS lógina og stýrisskipanina fara til fólkaatkvøðu – er sjálvsagt fullkomiliga óhugsandi.

## Hvar er at gera?

FF-blaðið sýnir, at fiskimenn og onnur verka- og vinnufólk ikki bara hava áhuga at gjalda gildið, men eisini vilja sessast við borðið. Tilmæli mítt skal vera: krevjið av tykkara fólkavaldu, at tey gera nýggjan skipan, sum tekur støðu til, um ALS og líknandi skipanir skulu bera til ella ikki, umframt at tann nýggja stjórnarskipanin verður orðað soleiðis, at tað ber til hjá okkum øllum at vera við í kjakinum um, hvør tann frægasta av teimum møguligu loysnunum er. Bæði stjórnarskipanin og týðandi lógir eiga at fara til fólkaatkvøðu, so vit fáa vitið og skilið hjá tí meiniga manninum uppí viðgerðina. Eisini mugu vit brúka heimildina í yvirtøkulógini um at stovna egnan landsrætt – og verða sera varin, tá vit velja rættarlimirnar – bert tá kunnu vit fáa veruliga óheftar og skilagóðar úrskurðir grundaðar á bæði skipan og lógir, ið fólkið hevur samtykt.


# Aðalfundur

Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 11. mars 2006 kl. 14.00 í Norðurlandahúsinum.

Skrá:

1. Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2. Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar.
3. Lógarbroytingar
4. Møgulig uppskot frá limum og nevnd.
5. Ásetan av limagjøldum.
6. Val av formanni.
7. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
8. Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi.
9. Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi leygardagin 4. mars 2006.

Uppskot til formann felagsins eru:

Gunnleivur Dalsgarð<br>Varðabú 32<br>100 Tórshavn

og

Heini Joensen<br>Skraddaragøta 3<br>188 Hoyvík

STARVSMANNAFELAGIÐ

Gott føroyskt umboð í Íslandi:

# Lina verður 90 ár

Í morgin tann 24. februar verður ein kendur føroyingur í Íslandi 90 ár. Hetta er Poulina Jónsson, vanliga kallað Lina. Hon er ættað úr Froðba. Pápi hennara var Jógvan, og mamman var Olevina hjá Liða Dáva í Norðragøtu. Tey vóru 9 systkin, 7 beiggjar og 2 systrar, og í dag liva bert systrarnar, Lina og Maria, eftir.



*Baldvin og Lina.*

Heimið var gott, og her vóru føroyskar dygdir lagdar í børnini. Systir hennara minnist, at Lina dugdi so sera væl at fáast við ull, og hon spann nógv sum ung genta.

Sum onnur ung fór Lina út at arbeiða, tá farið var úr skúlanum. Sum 17 ára gomul kom Lina til Havnar at tæna. Hon tænti hjá Guttorm Eysturoy, og hon tænti eisini hjá Hildu hjá Guttorm. Hon var eisini hjá Jens Simonsen, Bomm-Jens, og búði hon eisini her rættiliga leingi, meðan hon var í Havn. Har hon tænti gjørdist hon eisini vinur við húsfólkini í fleiri ættarlið.

Sambandið til Jens gekk aftur til Gøtu. Jens var nevniliga Norðragøtumaður, og hann vaks upp saman við Leon, sum var beiggi Linu. Leon kom nevniliga til Norðragøtu úr Froðba sum smádrongur. Her fekk hann barnalammilsi og fór ikki suður aftur. Tað kann verða nevnt, at kona Jens var Magnhild, sum var systir Jóhannes í Horni. Johannes giftist við Petru fyri oman Oyruna í Syðrugøtu. Petra var systir Honnu, sum giftist við Leon.

Lina arbeiddi á hospitalinum í Havn í nøkur ár. 23 ára gomul fær hon sonin Herálv Andreassen, sum seinni gjørdist ein av okkara góðu sangarum. Í 1946 fara Lina og Herjólvur til Íslands, og fór hon at arbeiða á tuberklahospitalinum á Vifilstøðum í Garðabær, har ein onnur kend føroysk kvinna í Íslandi arbeiddi, nevniliga Maria hjá Líggjasi á Fløttinum í Syðrugøtu. Tær arbeiddu saman í mong ár og gjørdust eisini vinkonur fyri lívið. Sonur Mariu eigur annars eisini part í hesum orðum.

Lina ætlaði bert at vera í Íslandi nakrar fáar mánaðir, men tá hitti hon ungan vakran mann Baldvin Jónsson, og tey giftust 28. november 1947. Lina kom tískil at verða búgvandi í Íslandi, meðan Herálvur kom heim aftur til Føroyar at búgva í 1948. 20. desember 1947 fingu tey sonin Jón. Baldvin hevur arbeitt í nógv ár á Hampiðjuni, sum er ein trolverkstaður í Reykjavík. Fyrsta starv Lina hevði eftir, at hon giftist var á Reykjavíkar apoteki. Her var hon í 5 ár. Síðan fór hon at arbeiða á katólska sjúkrahúsinum Landakoti, og her var hon til hon gavst at arbeiða.

Í 1953 flutti tey í nýbygd hús í Breiðagerði 11 í Reykjavík, og her eru tey enn.

Lina fekk at kenna nógva sorg, báðir synirnir doyðu ungir. Jón doyði í 1992 og Herálv í 1999. Hetta neit sera meint, men Baldvin hevur verið henni ein so framúrskarandi maður, og saman bóru tey hetta fyrimyndarliga.

Lina hevur eisini fingið eitt sera lætt sinni í vøggugávu, og tað hevur givið henni nógvar vinir. Í Føroyingafelagnum í Reykjavík hevur hon sett sín dám á. Henni dámar væl at dansa, og væl dugur hon at kvøða. Hon hevur eisini lært Baldvin stev, so hann stendur ikki aftanfyri nakran føroying í føroyskum. Hittinorðað er hon sum fáur, so mangan er látur, har Lina er. Lina er eisini heiðurslimur í Føroyingafelagnum, og hon hevur eisini verið í nevndini hjá felagnum í 5 ár.

### Tikin fyri smugling!

Hon er eisini trúgv at vitja heima í Føroyum, ættarkær sum fleiri í ættini. Á hesum ferðum hevur hon roynt seg sum "smuglari" av skerpikjøti. Íslendskir myndugleikar eru sum kunnugt sera "besnissaðir", tá ið tað snýr seg um "tekniskar handilsforðingar". Fyri at verja heimliga framleiðsla av lambskjøti, hava teir sett forboð fyri innflutningi av seyðakjøti við tí páskoti at sleppa undan smittuvanda, og hetta forboðið fevnir eisini um skerpikjøt. Men eins og nógvar aðrar føroyskar konur í Íslandi, hevur Lina eisini roynt at tikið ein bita av skerpikjøti við sær, tá hon hevur verið heima og ferðast. Vit vóru einaferð í ferðalagi, tá Lina var tikin í tollinum við einum bógvi. Hon bønaði og bað um at sleppa at fáa hann við sær. Men her var eingin bøn. Hendan tá nærum 90 ára gamla konan og hennara skerpikjøtsbógvur var ein alt ov stórur smittuvandi fyri allan tann íslendska seyðastovnin! Havi ikki kunnað torgað íslendskar tollarar síðan tá. Vit kunnu bert vóna, at hon hevur verið hepnari onkra aðru ferð.

### Nógvir føroyingar sitið væl hjá Linu og Baldvin

Tað eru ótaldar føroyingar, sum hava sitið væl inni hjá Linu og Baldvin á Breiðagerði. Tey eru tiltikin blíð og góð við øll, sum kom á gátt. Ein sum tekur til teirra blíðskap er Petra, sum er nevnd fyrr í greinini. Hon og Jóhannes fóru eitt ár árið saman við Leon, beiggja Linu, og Honnu til Íslands at vitja Linu og Baldvin. Ikki bert at tey vóru so framúr blíð, at Petra framvegis tekur til tað nógv ár seinni, men hetta saman var eisini galdandi fyri sonin Jón og hansara børn.

Ein annar, sum hevur tikið til blíðskapin hjá Linu, er Henry hjá Palla Jarnskor úr Norðragøtu. Hann er sonur systkinabarn Linu. Henry sigldi í 50-unum í Íslandi, og kom á gátt hjá Linu, tá tað lá fyri. Og Henry tekur framvegis til blíðskapin, sum hann møtti, har hann føldi seg sum heima.

Tað verður eisini sagt um Linu, at hon plagdi at fara oman á keiuna, tá skipini vóru inni at vita, um hon kundi finna onkrar føroyingar, sum hon kundi bjóða heim.

Seinast eg hitti tey, var fyri kortum á sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík, har Lina og Baldvin altíð møta upp, tá ið føroysk tiltøk eru á skránni. Tá fekk Henry eisini at vita frá Linu, at hon hevði tikið ímóti honum, tá hann var føddur fyri 72 árum síðani. Lina passaði nevniliga Poulinu upp.

Sama hjartalag vísti Baldvin. Áðrenn hálvtalað orð fór hann øll møgulig ørindi við honum og hóast komin væl til árs, fór hann sum eitt fok við bili sínum gjøgnum býin í Reykjavík.

Her kann verða skoytt uppí, at Henry var á myndini av íslendska bátinum "Sæfæri", sum vit høvdu í seinasta blaði. Ein annar av føroyingunum var Marno Jacobsen, sum var systkinabarn Linu. Mamma hansara var Gitta, systir Olevinu. Sigast kann um hesar báðar, at tær høvdu sama lætta lyndi sum Lina.

Ommubørnini í Íslandi eru nú um hana, og tað verður tikið til, hvussu góð tey eru við tey bæði, ikki minst nú Lina og Baldvin eru farin at eldast. Tað eru eisini fá børn, sum hava so nógv at takka fyri, sum tey.

Lina er framvegis spelkin sum ein ung genta, og ber seg sera væl verður sagt úr Íslandi av hennara ommubørnum, sum eru errin av henni.

Á 90 ára degnum verður veitsla fyri ætt og vinum. Og ættarkenslan fornoktar seg ikki. Tað fara ikki færri enn 20 av ættini til Íslands at heiðra føðingardagsbarnið, og tey eru sera spent til hesa ferðina.

Vit vilja eisini ynskja Linu hjartaliga tillukku við hesum stóra degnum. Vit hava onkuntíð hitst á føroyska sjómansheiminum í Reykjavík, og vit vita, at Lina og eisini Baldvin eru millum tey góðu umboðini fyri Føroyar, sum vit eiga í Íslandi.

Annars sendir Lina sjálv sínar bestu heilsanir til Føroyar og allar sínar vinir og kenningar her á landi. Hon harmast um, at Føroyar ikki eru ein sjálvstøðug tjóð, men hon ivast ikki í, at hetta fer at henda ein dag!

*ó.*



*Her er ættin úr Føroyum á vitjan hjá Linu og Baldvin í Íslandi. Frá vinstru síggja vit: Jón, Leon, Petra, Hannus, Hanna, Baldvin og Lina.*



# Manningarmynd

Hvør kennir hesa manning? Myndin er frá Fornminnissavninum.




## Grønlandstíðindi

frá Kára við Stein

6. februar
Minus 22,6 stig og lot av eystri. Tað hava verið ring ísviðurskifti uppi í rækjukassanum, har nakrir av trolarunum hava roynt; teir vórðu noyddir at stinga gronina suðureftir. Teir byrjaðu í Dýpinum, og so endaðu teir heilt suðuri í Sukurtoppadýpinum; men fiskaríið var ójavnt.

"Lómur" kom inn í kvøld, teir brutu túr av. Teir hava um 40 tons inni eftir at hava fiskað í 2 dagar. Teir hava ligið fastir í ísi nakrar ferðir, og komu nú inn at umvæla trolini. Teir ætla at sigla aftur í morgin.




*"Akamalik" var í Nuuk við fullari last 15. februar.*

"Natarnaq" er inni í Nuuk og landar, og "Sermisutturin" var inni í Manitsoq fríggjadagin og landaði.

9. februar
Tað eru –6,3 stig og lot av norðri. "Polar Amaroq" kom inn at landa í morgun, teir hava um fulla last inni. Annars eru ísviðurskiftini við at batna, og eg hoyrdi frá einum báti, sum royndi norður ímóti 68 stigum, at har var fiskandi fyri ísi.

14. februar
Minus 15,2 stig og stilli. "Lómur" kom inn at landa 100 tons í morgun. Teir ætla at loysa aftur til nýggjan túr í kvøld.

"Polar Nanoq" hevur verið inni í Nuuk og landað, og teir eru farnir nýggjan túr.

15. februar
–7,2 stig og lot av útnyðringi. "Salleq" kom inn at landa í morgun; teimum restar nøkur fá tons í last, og teir skulu landa til í morgin ári, tá teir skulu flyta skipið, tí teir hava okkurt brek á maskinuni, sum skal gerast, áðrenn teir fara út aftur.

"Akamalik" er í Nuuk og landar í dag; teir hava fulla last. Tað verður sagt, at teir hava fiskað óføra gott í hesum nýggja árinum.

16. februar
Tað eru minus 7,2 stig og stilli. "Polar Timmjarmiut" kom inn at landa og skifta fólk í morgun. Teir hava fulla last hendan túrin.

17. februar
–15,3 stig og stilli. Bæði "Timmurin" og "Salleq" fóru út í dag til nýggjan túr.

Grønland hevur fingið meira sjógv at ráða yvir. Sermitsiaq skrivar í dag, at í 1993 funnu týskir granskarar, sum vóru við ísbrótaranum "Polarstern", oynna Tobias Ø. Tann 28. apríl 2001 hongdu tríggir granskarar frá Grønlands Forundersøgelse, ASIAQ, Danmarks og Grønlands Undersøgelse og Kort- og Matrikelstyrelse tað grønlendska og danska flaggið á stong. Oyggin liggur 70 metrar frá Lamberts Land, har sum grøvin hjá Jørgen Brøndlund er. Sjóøkið er sostatt víðkað við 885 kvadratkilometrum.

## Aðalfundur

Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður mikudagin 15. mars 2006, kl. 19.00 í hølum felagsins J.H. Schrøtersgøta 9.

Skrá:
1. Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársrokniskapi til góðkenningar.
3. Viðtøkubroytingar.
4. Val av nevndarlimum.
5. Ymiskt.

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi mikudagin 8. mars 2006.

NEVNDIN




## Hvørjum tørvar bjarging?

"...tí at menniskjusonurin
er komin at leita upp hitt farna
og at bjarga tí."
*Luk. 19,10*

Meira enn eina ferð havi eg hoyrt tey sokallaðu "vælbjargaðu" siga: "Tað var gott, at hann/hon møtti Jesusi og byrjaði eitt nýtt lív!"

Hann ella hon, sum sipað verður til, hava ofta verið fólk við sjónligum syndum og trupulleikum, so sum alkaholikarin, rúsmisnýtarin, lógbrótarin, tjóvurin, kúllurin, frellan og tey gomlu og doyggjandi.

Tey vælbjargaðu og "frísku" hava eitt ávíst skynsemi fyri, at hesi "sjúku" tørva Jesus, tørva fyrigeving syndanna og nýggja lívsførslu og nýggja kós.

Tað løgna er, at samstundis hava hesi lítla ella onga fatan av, at teimum sjálvum tørvar alt hatta. Tey føla seg á ein hátt góð, rættvís...

Tað var við tílík menniskju, Jesus segði: "Ikki tarvast teimum frísku lækna, men teimum, ið ilt hava. Eg eri ikki komin at kalla rættvísar, men syndarar til umvendingar." Luk. 5,31-32.

Sanniliga er tað gott og neyðugt, at "sjónligir syndarar, taparar og sjúk" møta Jesusi og byrja eitt nýtt lív við nýggjum innihaldi. Í nýggja testamenti eru hópin av tílíkum hendingum, sum undirstrika orðini um, at "Jesus kom at leita upp hitt farna og at bjarga tí."

Samstundis sigur Bíblian, at øll, øll hava syndað, øll viltust burtur, eingin er rættvísur, og øllum tørvar bjarging og fyrigeving. Øllum hesum farnu og burturvilstu leitar Jesus eftir og vil bjarga – eisini teimum "fínu og sjálvrættvísu" syndarunum.

***Eingin*** er vilstur so langt av leið, at Jesus ikki leitar hann upp.

***Eingin*** er í tílíkum syndadíki, at Jesus ikki fær fyrigivið játtaðar syndir.

***Eingin*** er í tílíkum myrkri, at Jesu eygu ikki síggja hann.

***Eingin*** er fallin so djúpt, at Jesu armar ikki røkka honum.

***Eingin*** er í tílíkum syndaleinkjum, at Jesus ikki fær slitið tær.

***Eingin*** er í tílíkum ófriði, at Jesus ikki fær bjargað og givið sín frið.

*Náði, at hann fann meg,*
*náði, at hann vann meg,*
*:,:náði at hann bar meg*
*heim til sín":,:*
*Ms. 380*



## Vit hava stórt úrval av fiskireiðskapi til línu og snellu

Svøvlalínu frá 3,5 til 9 mm. Tit avgera sjálv, hvussu langt skal vera millum svøvlarnar.

Húkar í ymsum støddum og sniðum. Rippaðir og órippaðir. Teymar frá nr. 4 til 20 í fleiri litum.

Eisini eru handlarnir fullir av klæðum til sjó- og arbeiðsfólk. Frá innast til uttast.

VÁSTI 459010

**TEYMAVIRKIÐ**
FO-620 Runavík · Tel. 473000

**SNØRISVIRKIÐ**
FO-700 Klaksvík · Tel. 455254

**GLÆMAN**
FO-100 Tórshavn · Tel. 318600



## Føroya størsti veitari til ídnað og vinnu

**Pakningur úr kartong, bylgjupappi og tjúkkum pappi, plastikki og øðrum tilfari til ídnaðarlig endamál.**

**Vit útvega eisini:** Plastvørur · Pakkiútgerð · Maskinur · Arbeiðsklæði · Trygdarútgerð · Knívar · Tilsetning · Sekkir · Plattar · Vaskievni

*Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari ...sjálvandi til besta prísin!*



**FARPACK**

Smyrilsvegur 5 . P.O. Box 3099 . 110 Tórshavn . Faroe Islands
Tel +298 35 3000 . Fax +298 35 3010 . farpack@farpack.fo
www.farpack.fo

petur & petur - 320870

**Hógv Handilsvirki**
Oman á Sand, postboks 188
FO-660 Søldarfjørður
Tlf. 470 700
Fax 470 401
E-mail: hogv@hogv.fo

## NÚ ER GOTT AT VERA BÁTAEIGARI!

## Ketilin sum virkar - til bátar og skip!

- Brúkar vanliga oljufýring 230v og umformara!
- Er bert 41 x 41 x 50 cm
- Heldur motorin heitan,
- umframt radiatorar og annað!
- Sera gott fyri tólini á brúnni!



**Hógv Handilsvirki · tlf 470 400 · hogv@hogv.fo**

FFblaðið BLAÐ VERKA- OG VEIÐIMANNA
Vit átaka okkum at gera lýsingar fyri virkir og einstaklingar uttan meirkostnað fyri lýsaran
Her fært tú bestu lýsingaravtaluna • Blaðið verður sent øllum skipsmanningum
Lýsingar Tlf: 311569

# Ársins fyrstihjálpari 2005

Týsdagin 14. februar varð ársins fyrstihjálpari fyri 2005 tilnevndur.

Tað hava verið fleiri hendingar, sum kundu givið umrøddu viðurkenning, men tað er bert møguleiki fyri at heiðra einari og tað gjørdist henda:

Tann 1. januar í 2005 hendi ein syrgilig ferðsluvanlukka við prutli á Velbastaðvegnum í Havn, har tvey doyðu og ein yvirlivdi.

Kári og Lydia Durhuus komu í ta støðu, at dreingirnir í óhappinum vóru synir Lydiu og fostursynir Kára. Annar sonurin doyði og annar yvirlivdi. Støðan var sálarliga ógvuliga tyngjandi, men sá Kári tó, at tað eisini vóru nógv ung í vinaskaranum hjá hesum trimum ungu, sum vóru sálarliga skelkaði.

Kári fekk so, við stuðli frá Lydiu, skipa fyri „debriefing", sálarliga hjálp, á Landssjúkrahúsinum fyri teim eftirsitandi og vinfólkum við luttøku frá politistum og lækna.

Tey bæði vórðu tískil útnevnd til ársins fyrstuhjálparar.

Síðan vóru eisini heiðursbrøv handað. Eitt av teimum var vegna hesa hending.

Tann 27.10.05 hendi ein syrgilig ferðsluvanlukka við prutli í Vági.

Tveir ungir dreingir á prutli renna inn í parkerðan lastbil/trailara.

Feðgarnir Sigmund og Hjalgrím (Gimmi) Andreasen, ið búgva nær við, har vanlukkan hendi, hoyrdu rópini og lupu á dyr at hjálpa. Vóru umhugsnir at taka teppi/presending við í ferðini.

Teir skipaðu fyri at verja móti kulda, tilkalla hjálp, herundir ambulansa og veita sálarliga fyrstuhjálp.

Sigmund er av kendari fiskimannaætt, og er sjálvur skipari og fiskimaður.

Tey sum annars fingu heiðursbrøv vóru:

– Victor Carlsen, Mirjam Carlsen og Sveinbjørn Jakobsen.
– Árni Dalsgaard.
– Mariann Reinert.

Í fyrstahjálp verða tær 4 høvuðsreglurnar sagdar at vera:

1. Steðga vanlukkuni.
2. Lívbjargandi fyrstahjálp.
3. Boðsend hjálp (112)
4. Veit vanliga fyrstahjálp.

Umráðandi er, at øll eru fyrireikað uppá at koma í eina slíka støðu. Til hetta fæst eisini hjálp frá Reyða Krossi.



*Kári og Lydia Durhuus gjørdust ársins fyrstahjálparar.*



*Sigmund th. og Hjalgrím Andreassen fingu heiðursbræv.*



*Tann 18.12.05 eru fólk á morgunmøti í Evangeliuhúsinum tá knappiliga róp kom í "er nakar sum dugir fyrstuhjálp"?*
*Orøkin var hon, at ein eldri maður, Leivur hjá Grækaris í Kvívík, var dottin og tyktist at vera lívleysur.*
*Tey trý Victor Carlsen, Mirjam Carlsen og Sveinbjørn Jakobsen eru beinan veg har og klár at hjálpa.*
*Pulsurin merktist ikki, tí góvu tey hjarta og andahjálp, sum tey skiftust um. Ambulansi bleiv boðsendur. Eftir 3-4 minuttum lat Leivur upp eyguni og kundi svara, og hann var eisini til staðar á samkomuni.*
*Fyri hetta fingu tey trý heiðursbræv. Her eru f.v. Mirjam, Victor og Sveinbjørn.*

## dagsins MYND

Ein av mátunum at skapa samband út í heim er við tað umbýti av ungdómi, sum fer fram. Vit senda ung út í heima at ganga í skúla í eitt ár. Afturfyri koma útlendsk ung higar í somu ørindunum. Hetta merkir, at ung úr nógvum londum eru í Føroyum, og tey hittast so eisini av og á. Hesi dámligu ungfólkini hittu vit nú um dagarnar. Øllum teimum dámar væl í Føroyum, men nú fer at styttast til tey sleppa heim aftur. Her síggja vit f.v. David úr Ungarn, Dominique úr Týskland, Sophie úr Týsklandi og Joan úr Hongkong.







Politisturin sigur við biltjóðin:
- "Hví tókst tú bilin?"
- "Eg skuldi skunda mær til arbeiðis".
- "Men hví tókst tú ikki bara bussin?".
- "Eg havi ikki koyrikort til buss".

*****

Hvat hevur nýføddi prins Christian felags við Rip, Rap og Rup?
- Onkel Joakim...

*****

Skrivstovukonan bankaði á hurðina hjá stjóranum.
- Ja, hvat er tað Marjun?
- Ein maður stendur í gongini við eini rokning.
- Sig við hann, at eg ikki eri inni.
- Ok!
Tveir minuttir seinni bankar aftur á hurðini hjá stjóranum.
- Hvat er tað nú Marjun?
- Maðurin við rokningini bað meg heilsa tær og siga, at hann kom aftur onkran annan dag at gjalda rokningina.

*****

Hvat er munurin á einum optimisti, einum pessimisti og einum verkfrøðingi?
- Optimisturin sigur, at glasið er hálvfult.
- Pessimisturin sigur, at glasið er hálvtómt.
- Verkfrøðingurin sigur, at glasið er dupult so stórt, sum tað átti at verið.

*****

Hvussu ber tað til, at tað eitur mánaðarløn, tá peningurin bert røkkur til 14 dagar?